# AÐALFUNDUR HJÁ KOMMUNUFELAGNUM

# 2019

Kommunufelagið



Útgevari: Kommunufelagið
Uppseting: Nudlavirkið
Myndir: Ólavur Frederiksen, Faroephoto
Prent: Føroyaprent
Svanamerktur prentlutur 541 705



# Innihaldsyvirlit


Inngangur . . . . . 4
Framhaldandi vøkstur . . . . . 5
Avbjóðingar fyri framman . . . . . 5
Landsstýrið minkar inntøkugrundarlagið hjá kommununum . . . . . 6
Orrustan um fyritíðarpensjónirnar . . . . . 6
Felagið innanhýsis . . . . . 10
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið . . . . . 10
Barnaverndarstovan . . . . . 11
Fosturforeldraskipanin . . . . . 11
Menning og hagtøl . . . . . 11
Barnahúsið . . . . . 13
Fyribyrgjandi arbeiði við børnum og ungum . . . . . 13
Fráboðað lógarbrot hjá ungum . . . . . 13
Betri samstarv millum land og kommunur . . . . . 14
At enda . . . . . 15
Skjøl til formansfrágreiðingina . . . . . 16–21
Ískoyti 1: Eldraøkið . . . . . 22
Gongdin í fólkasamansetingini . . . . . 22
Kostnaðurin av eldraøkinum . . . . . 23
Ískoyti 2: Kommunuhugtakið . . . . . 27
Kommunur í stýrisskipanarligum høpi . . . . . 27
Kommunalrætturin . . . . . 27
Um Kommunufelagið . . . . . 28
Viðtøkur fyri Kommunufelagið . . . . . 30
Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið . . . . . 33
Viðtøkur fyri Barnaverndarstovu Føroya . . . . . 35


*Funningur*



*Dalur*

# Inngangur

Góðu kommunustýrislimir, gott fundarfólk!

Eg skal við hesum bjóða tykkum hjartaliga vælkomin á aðalfundin hjá Kommunufelagnum.

Staðbundna fólkaræðið er hornasteinurin í føroyska vælferðarsamfelagnum og tryggjar okkum øllum ávirkan á egin lívsviðurskifti og fjølbroytni í lívskorunum á staðnum. Tær 29 kommunurnar, og teir fleiri enn 200 kommunustýrislimirnir, sum eru karmurin um hendan aðalfundin í dag, eru fram um alt trygdin fyri einum fólkaræðisligum fjølbroytni í Føroyska samfelagnum. -Trygdin fyri, at hetta samfelagið kann mennast í landafrøðiligari javnvág, kjølfest í spjaddari búseting og við livandi lokalsamfeløgum. Hetta eru virði sum eitt sentralt stýri ongantíð kann tryggja okkum.

Hetta eru samstundis virði, sum vit eiga at fjálga um og virðismeta. Virði sum nógv fólk í okkara grannatjóðum øvunda okkum. Tað er sjón fyri søgn. Alsamt fleiri útjaðarasamfeløg kring okkum byrja at hyggja hendavegin, og at síggja okkum sum eitt fyrimyndarligt samfelag, tá ið snýr seg um menna samfelagið alt, heldur enn bert miðstaðarøkini. Hóast hetta, eru vit helst fleiri sum høvdu ynskt eina uppaftur javnari menning av landinum, kanska serliga vit sum framhaldandi ikki hava fingið fast samband, tí eitt væl ment infrakervi er fortreyt fyri framleidnisvøkstri og vælferð.

Tey eru tó nógv, sum ynskja einar meira sentralt stýrdar Føroyar. Tilmælini frá búskaparráðnum seinastu árini eru góð dømi um tað. Í tilmælinum frá ráðnum hevur verið grundgivið fyri einari nógv neyvari fíggjarstýring av føroysku kommununum, Stundum hava tilmælini verið sera víðfevnd og róð framundir, at landsmyndugleikin meira ella minni skal seta kommunurnar undir umsiting og raðfesta teirra vegna. Tílíkur hugburður tykist eisini at valda í Fíggjarmálaráðnum, og í onkrum av hinum ráðunum við.

Stundum tykjast ráðini, og partar av politisku skipanini, ikki at kenna til, ella grundleggjandi at hava misskilt rættargrundarlagið undir føroysku kommununum. Tey halda at kommunurnar eru skipaðar undir aðalráðunum, og eru at javnmeta við aðrar almennar stovnar.

Vit, fólkavaldu kommunustýrislimir, umboðandi lokala fólkaræðið í hesum samfelag, skulu tí áhaldandi verja sjálvsavgerðarrættin hjá kommununum, soleiðis at eisini tey, ið eftir okkum koma, fara at hava tann framíhjárætt at skipa seg í lokalar eindir við heimildum at skipa og ávirka egin viðurskifti.

Bert soleiðis kunnu vit eisini í framtíðini hava livandi lokalsamfeløg í øllum pørtum av landinum.

Í fjør gjørdu vit eitt ískoyti til ársfrágreiðingina, sum viðgjørdi kommunala búskapin. Ætlanin var, at hetta skuldi gerst ein fastur táttur í ársfrágreiðingini, men avgerð er síðani tikin um at geva eina árliga kommunala búskaparfrágreiðing út. Hendan kemur væntandi út beint áðrenn summarsteðgin.

Vit vóna, at hon við tíðini verður ment til eina fjøltáttaða kommunala búskaparfrágreiðing, sum verður almannakunngjørd á hvørjum ári. Vónandi verður tikið væl ímóti hesum.

Sum ískoyti til hesa ársfrágreiðing liggur ein stutt frágreiðing um eldraøkið

Enn einaferð hjartaliga vælkomin á aðalfund hjá Kommunufelagnum.

# Framhaldandi vøkstur

Tað gongur væl í Føroyum. Vit hava metlágt arbeiðsloysi, fólkatalið veksur, inntøkurnar vaksa og virksemið í landinum økist. Samstundis liva vit í eini tíð, har sambandið við umheimin støðugt veksur, og setir føroyska samfelagnum krøv um at stýra í einum heimi við vaksandi ótryggleika. Miðlanir fylla hvønn dag stovurnar hjá okkum við óvissuni um Brexit, truplu viðurskiftunum millum USA og Kina, øktari hernaðardubbing, ikki minst her í høvunum kring okkum, og stórum flóttafólkastreymum og umhvørvishóttanum víða um heim. Hetta eru alt viðurskifti, ið kunnu ávirka okkara livistøði meint – latið okkum ikki gloyma tað.

Á seinasta aðalfundi kundu vit tó fegnast um, at fólkatalið var farið uppum 50.000. Nú eru vit knapt 51.500, og skarin av løntakarum hevur ongantíð verið størri.

Tann stóra broytingin í gongdini í fólkatalinum kemur einamest av broyttu flytingini, har fráflytingin er minkað nógv, samstundis sum tilflytingin er vaksin. Vit skulu heilt aftur til 1980 fyri at finna so lága fráflyting sum seinastu árini. Saman við lutfalsliga høgum burðartali, gevur hetta stóra fólkavøksturin.

Hóast stóran samanlagdan fólkavøkstur, so eru tað ikki øll øki í landinum sum hava fólkavøkstur.

Norðoya-, Eysturoyar-, Streymoyar- og Vága sýslur hava síðani aldarskiftið havt munandi fólkavøkstur, men sunnaru sýslurnar, Sandoy og Suðuroy, hava havt eina minking í fólkatalinum; ikki bara síðani aldarskiftið, men eisini hetta seinasta árið. ( Sí Mynd 2c á síðu 18).

Gongdin í Sandoy og Suðuroy er hin sama, sum tann vit hava sæð á útoyggjum í áratíggju. Íbúgvaratalið er lækkað munandi, og fólkasamansetingin er nógv skeiklað, tí samstundis sum fráflytingin er stór, velja fá ung fólk at flyta til – ella aftur til – økini. Tað hevur við sær færri fólk í arbeiðsførum aldri, ein lutfalsliga størri partur eru eldri fólk uttanfyri arbeiðsmarknaðin, og burðaravlopið og netto tilflytingin hava verið negativ seinasta árið. Vandi er fyri, at hesi samfeløg koma í eina ónda ringrás við enn størri fráflyting, afturstigum og við tíðini eini beinleiðis niðurlaðing.

Tað sæst týðuliga, hvussu stóran týdning fasta sambandið við miðstaðarøkið hevur. Felags fyri Sandoynna og Suðuroynna er, at sýslurnar bert hava sjóvegis samband. Hinvegin er lutfalsliga størsti fólkavøksturin í flestu av teimum økjum, sum hava fingið fast samband. Tí er gleðiligt, at byrjað er uppá fasta sambandið suðureftir, og vónandi verður hildið áfram, til allar stóru oyggjarnar er knýttar saman.

Í eina tíð hevur verið ávarað um, at vit ikki skulu vænta sama búskaparvøkstur komandi árini, men fyri kommunala geiran sum heild er tó einki, sum beint nú bendir á, at vøksturin er við at hasa av.

Tveir teir fyrstu mánaðirnir í 2019 hava inntøkurnar enn einaferð sett met. Tveir teir fyrstu mánaðirnir eru skattainntøkurnar vaksnar við knapt 35 mió. kr. í mun til sama tíðarskeið í fjør. Hetta svarar til ein inntøkuvøkstur á omanfyri 12 %. Eftirlønarskatturin er vaksin við meira enn 10 mió. kr. tveir teir fyrstu mánaðirnar svarandi til ein vøkstur á 19 %. Inntøkuvøksturin hevur verið í so at siga øllum kommunum í landinum.

## Avbjóðingar fyri framman

Vit, sum varða av kommununum, mega ikki lata okkum tøla av teimum góðu tíðunum, og teimum metstóru inntøkunum, sum kommunurnar í løtuni hava.

Umframt tey tekin um hóttanir móti vælferðini, ið vit longu síggja úti í heimi, so vísir Búskaparráðið í várfrágreiðingini 2018 á stórar framtíðar demografiskar avbjóðingar. Tí soleiðis sum gongdin verður í samansetingini av aldursbólkunum frameftir, verður fíggjarligi haldføristrupulleikin longu í 2035 ein tann størsta einstaka avbjóðingin hjá føroyska samfelagsbúskapinum.

Í dag eru í Føroyum 4,1 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn persón sum er omanfyri 67 ár. Longu í 2035 eru bert gott og væl 2,5 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn borgara sum er 67 ár. (Sí Mynd 1 á síðu 22).

Fram til 2050 fer talið av teimum, sum eru 67 ár og eldri at tvífaldast, og talið av teimum sum eru omanfyri 80 ár fer at trífaldast. Fyri land og kommunur merkir hetta, at útreiðslur til heilsuverkið og eldraøkið fara at hækka munandi, um ikki vælferðarhugtakið verður endurhugsað grundleggjandi innan hesi málsøki.

Fyri kommunurnar gerst trupulleikin eisini fíggjarliga rættiliga ítøkiligur, tí inntøkugrundarlagið hjá kommununum byggir í stóran mun á lønarskatt. Tá ið framskrivingar vísa, at arbeiðsmegin fer at minka niður í eina helvt komandi 30 árini, merkir hetta, at inntøkurnar hjá kommununum eisini fara at minka við eini helvt, um einki annað verður broytt.

Tað er tí umráðandi, at politiska skipanin sum heild tekur hesar avbjóðingarnar í álvara og arbeiðir fyri at fjøltátta inntøkugrundarlagið hjá kommununum, samstundis sum at áherðsla sjálvandi verður løgd á at minka um útreiðslurnar í komandi tíðum, m.a. við at leggja stóran dent á generelt fyribyrgjandi arbeiði og hugburð um tíðliga í lívinum at fyrireika seg til heilsugóð eldraár.

Búskaparráðið og sonevnda skattanevndin tykjast at síggja álvaran í teimum avbjóðingum sum kommunurnar standa yvirfyri.

Skattanevndin, sum landsstýriskvinnan í fíggjarmálum setti í 2016, skuldi kanna føroysku skattaskipanina og koma við tilmælum um eina meiri einfalda og gjøgnumskygda skatta- og avgjaldsskipan. Tá ið tað snýr seg um haldførið hjá kommununum, ger skattanevndin eisini vart við, at kommunurnar frameftir fara at vanta fígging til eldraøkið.

Í stuttum staðfestir nevndin, at árini fram til umleið 2027 kann roknast við, at inntøkurnar frá skatti av pensjónsinngjøldum, sum kommunurnar fáa, fara at vaksa meir enn tað, sum útreiðsluvøksturin verður á eldraøkinum. Men at hinvegin kann roknast við, at útreiðslurnar á eldraøkinum eftir umleið 2027 fara at vaksa meir enn inntøkurnar frá skatti av pensjónsinngjøldum vaksa. Tí

kann roknast við, at avlop verður orsakað av fíggingarleistinum tey fyrstu árini, men at hall síðani verður ár undan ári fyri kommunurnar.

Grundað á hetta mælir skattanevndin til at broyta verandi fíggingarleist. Heldur eigur landskassin at gjalda kommununum eina árliga upphædd (heildarveiting) fyri at reka eldraøkið. Nevndin mælir til, at landið rindar kommununum eina ávísa upphædd til eldraøkið, sum er ásett eftir talinum av borgarum, sum eru 67 ár og eldri. Upphæddin skal fyrstu ferð verða ásett við samráðing millum land og kommunur. Eftir hetta skal upphæddin verða dagførd eftir talinum av borgarum, sum eru 67 ár og eldri, og við lønarvøkstrinum fyri starvsfólk í eldrarøktini.

Síðani skattanevndin legði fram sítt tilmæli fyri landsstýrinum er einki frætt aftur um hetta tilmælið, enn minni hevur nøkur umrøða verið av teimum tilmælum, sum skattanevndin annars gjørdi, hóast fleiri teirra raka djúpt inn í kommunala búskapin og í stóran mun ávirka fíggjarliga haldførið hjá kommununum, og hóast nevndin staðiliga segði, at hetta var nakað land og kommunur eiga at viðgera í felag.

Kommunufelagið metir, at fleiri av uppskotinum frá skattanevndini vóru áhugaverd og átti at verið viðgjørd neyvari við tí fyri eyga at breiðka skattagrundarlagið hjá føroysku kommununum og við tí fyri eyga, at fáa eitt støðugari inntøkugrundarlag til kommunurnar.

Kommunufelagið mælir eisini til, at land og kommunur hyggja at tí inntøku- og útreiðslubýti, sum í dag er millum land og kommunur, við tí fyri eyga at fáa eitt greiðari, rættvísari og ikki eitt minst gjøgnumskygdari býti av inntøkum og útreiðslum.

## Landsstýrið minkar inntøkugrundarlagið hjá kommununum

Landsstýrið hevur framt nakrar nýskipanirnar, men tað sum eyðkennir hesar er, at tær fram um alt annað eru ætlaðar at styrkja haldførið hjá landskassanum. Hinvegin hava tær í flestu førum neiliga fíggjarliga ávirkan á kommunala geiran.

Landsstýrið hevur við fiskivinnunýskipanini skapt landskassanum nýggjar inntøkur við avgjøldum á ali- og fiskivinnu. Avleiðingin fyri kommunukassarnar kring landið er hinvegin negativ. Kommunurnar fáa minni inn í partafelagsskatti og persónligum inntøkuskatti. Niðurstøðan er, at tilfeingisgjøldini styrkja um haldførið og inntøkurnar hjá landskassanum, men máa samstundis burturav inntøkunum hjá kommununum, og harvið versnar haldførið hjá kommunala geiranum.

Sama ger seg galdandi viðvíkjandi pensjónsnýskipanini. Pensjónsnýskipanin hevur í síni heild sum høvuðsendamál at styrkja haldførið hjá landskassanum við at lækka pensjónsútreiðslurnar, men leggur ikki á sama hátt upp fyri framtíðar haldførinum hjá kommununum, heldur hinvegin.

Ein skattalætti verður nú latin í forskattingini av pensjónum, sum hevur við sær, at inntøkurnar hjá kommununum, sum upprunaliga vóru ætlaðar at fíggja vaksandi útreiðslurnar á eldraøkinum, minka.

Ein onnur broyting í eftirlønarlógini, sum hevur stóra ávirkan á kommunala geiran, er, at lóggivna eginuppsparingin á 15% verður broyt til 12%. Fyri kommunurnar merkir hetta, at væntaði vøksturin í forskattingini av pensjónum minkar munandi, tilsamans omanfyri 20 %

Onkrar broytingar eru í pensjónsnýskipanini, sum geva kommununum størri inntøkur, men samanumtikið er eyðsæð, at pensjónsnýskipanin hevur sum aðalmál at tryggja haldførið hjá landskassanum, tá ið um ræður útreiðslur til almennar pensjónir – útlitini fyri haldførinum í kommununumkassunum verða hinvegin ikki betri við uppskotinum.

## Orrustan um fyritíðarpensjónirnar

Í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2018 legði landsstýrið fram uppskot um at geva fyritíðarpensjónistum ein skattalætta.

Tað, sum ikki kom fram, var, at broytingarnar aftanfyri hendan lætta til fyritíðarpensjónistar ikki komu at kosta landskassanum nakað, men hinvegin góvu landskassanum eitt yvirskot á 9,4 mió. kr. Kommunurnar mistu hinvegin við uppskotinum 25,3 mió. kr..

Hetta varð gjørt við at gera grundupphæddina hjá fyritíðarpensjónistum skattafría. Tað kostaði landskassanum 12,5 mió. kr. og kommunukassunum 25,3 mió. kr. í mistum skattainntøkum. Men fyritíðarpensjónistar fáa  eisini eina viðbót. Hendan kundi nú lækkast munandi og framhaldandi geva fyritíðarpensjónistum ein lætta. Landið lækkaði viðbótina við samanlagt 21,9 mió. kr. Broytingarnar høvdu sostatt við sær eina sparing fyri landskassan á 9,4 mió. kr., samstundis sum at kommunurnar mistu heilar 25,3 mió. kr. í inntøkum.

Harumframt vísti tað seg, at kommunur, sum frammanundan høvdu eitt veikt inntøkugrundarlag, komu at hava ein lutfalsliga nógv størri miss enn kommunur, sum høvdu eitt gott inntøkugrundarlag. Hesar fíggjarligu avleiðingar vóru als ikki lýstar í lógaruppskotinum.

Væntast kann, at kommunurnar missa í minsta lagi hesa upphædd í 2019. Sostatt hevur kommunali geirin mist omanfyri 50 mió. kr. hesi tvey árini skattalættin hevur virkað, samstundis sum landskassin í nevnda tíðarskeiði sparir uml. 20 mió. kr. í útreiðslum.

Seta vit hetta í ein ítøkiligan samanhang, kann nevnast, at kommunurnar í Suðuroynni samanlagt høvdu eitt undirskot á 3 mió. kr. av eldraøkinum í 2018. Bara nevndu broytingar hjá landsstýrinum kosta kommununum í Suðuroynni uml. 4 mió. kr. í 2018, t.v.s. 1 mió. kr. meir enn samanlagda undirskotið hjá øllum kommununum í Suðuroynni frammanundan var í 2018.

Í Sandoynni minkaðu samanlagdu skattainntøkurnar í 2018 gott 1 mió. kr. Um landsstýrið ikki hevði gjørt hetta inntriv mótvegis kommunala geiranum, so høvdu skattainntøkurnar í Sandoynni í staðin voksið við góðum 100.000 kr. í 2018.



*Viðareiði*

Ikki tí, kommunurnar norðanfjørðs skulu eisini djúpt niður í kommunukassarnar fyri at fíggja hetta lógaruppskotið hjá landsstýrinum, tó at tað eru tær kommunur, ið eru ringast fyri fíggjarliga, sum eru fyrstar at rópa varskó.

Løgmaður og landsstýriskvinnan í fíggjarmálum hava hvør í sínum lagi givið lyfti um, at kommunurnar skuldu haldast skaðaleysar, og at kommunurnar samanlagt ikki skulu vera fyri fíggjarligum missi vegna lógaruppskot hjá sitandi samgongu.

Støðan í dag er hon, at løgmaður hevur givið Fíggjarmálaráðnum uppgávuna at tryggja, at kommunurnar verða hildnar skaðaleysar, men Fíggjarmálaráðið hevur higartil einki gjørt fyri at loysa uppgávuna.

Orsakað av hesi tvístøðu millum Fíggjarmálaráðið og Kommunufelagið er alt samstarv og samskifti millum Fíggjarmálaráðið og Kommunufelagið fyribils steðgað.

Hetta er eisini orsøkin til, at Kommunufelagið hevur heitt á allar limakommunurnar um fyribils at steðga á við at skriva undir samstarvsavtalur við Fíggjarmálaráðið um Talgilding Føroya.



*Saltnes*



# Felagið innanhýsis

1. januar 2014 vóru Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag løgd saman í eitt Kommunufelag. Kommunufelagið hevur sostatt 5 ár á baki.

Við samanleggingini varð virksemið hjá Barnaverndarstovu Føroya og Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum eisini skipað undir einari og somu fyrisitingarligu leiðslu, hóast talan framvegis er um tvær sjálvstøðugar virkiseindir.

Her skal stutt greiðast frá virkseminum á hesum økjum.

## Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Kommunurnar hava við limaskapinum í Kommunufelagnum givið Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum heimild at samráðast um sáttmálar viðv. lønar- og setanarviðurskiftunum hjá starvsfólkunum í kommununum. Elfelagið SEV og Renovatiónsfelagsskapurin IRF eru eisini vorðnir partar av felagnum – og soleiðis fevnir samráðingarheimildin hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um allan kommunala geiran.

Í fyrireikingunum undan samráðingunum hevur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið seinastu árini bjóðað starvsfólkum í kommunala geiranum, sum varða av ymisku sáttmálunum, til fundar at viðgera yvirskipaðu ætlanirnar hjá felagnum fyri samráðingarnar. Felagið umboðar kommunurnar og interkommunalu felagsskapirnar í samráðingum á kommunala arbeiðsmarknaðinum og hevur tí tørv á, at kommunali geirin stuðlar felagnum í krøvunum og í øðrum viðurskiftum í samráðingunum við fakfeløgini.

Seinnu árini hevur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið lagt seg eftir at hava eitt tættari samstarv við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, sum samráðist um sáttmálar fyri starvsfólkini í tænastu hjá landinum. Við einum tættari samstarvi við Fíggjarmálaráðið og luttøku í fyrireikingunum undan samráðingunum metir Kommunala Arbeiðsgevarafelagið seg hava eina størri ávirkan á gongdina í samráðingunum. Soleiðis meina vit eisini, at felagið frameftir eigur at taka lut í fyrstu samráðingunum, tá karmurin fyri sáttmálaskeiðið verður lagdur.

Fyri at fáa eitt greiðari samstarv og eitt betri skipað samskifti við Fíggjarmálaráðið verður arbeitt við eini rammuavtalu um eitt yvirskipað samstarv partanna millum. Partarnir hava sett sær fyri at gera eina ætlan um m.a., hvussu arbeiðast skal saman undir samráðingunum t.d. við at gera avtalu um, nær tað er skilagott at samráðast saman, og nær tað gevur betri meining at samráðast hvør sær.

Fyri at taka samanum gongdina í samráðingarumfarinum 2017 – 2019/2020 og støðuna á almenna- og kommunala arbeiðsmarknaðinum, má hyggjast at fyrireikingunum undan samráðingunum, har Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið m.a. umrøddu búskaparligu útlitini og viðurskiftini á sáttmálaøkinum. Partarnir samdust ávegis um karmarnar fyri samráðingarumfarið, áðrenn Fíggjarmálaráðið síðani legði støðið fyri samráðingarnar saman við Starvsmannafelagnum um miðjan oktober 2017.

Síðani fór Kommunala Arbeiðsgevarafelagið til samráðingar við Starvsmannafelagið við sama útgangsstøði, sum varð lagt í semjuni við Fíggjarmálaráðið. Samráðingarnar gingu væl inntil Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar gjørdu sermerktu semju sína, sum skuldi vísa seg at fáa avleiðingar fyri allar eftirfylgjandi samráðingar á almenna- og kommunala sáttmálaøkinum.

Feløgini, sum seinni komu framat samráðingarborðinum, høvdu ilt við at góðtaka karmin, sum varð lagdur í samráðingunum við Starvsmannafelagið. Feløgini kravdu at fáa somu lønarhækkan til limir sínar, sum sjúkrarøktarfrøðingarnir fingu í semjuni við Fíggjarmálaráðið. Samráðingarnar komu í drag, og fleiri feløg fóru í verkfall. Soleiðis eru fleiri av samráðingunum endaðar í seming, har Semingsstovnurin í fleiri umførum legði fram semingsuppskot millum partarnar, sum hesir einans høvdu møguleika at góðtaka ella vraka.

Arbeiðsmarknaðurin hevur tí undanfarna árið verið merktur av verkføllum, og spurningurin um undantøk hevur fylt nógv. Kjak um undantøk hevur somuleiðis verið stórur partur av samráðingunum, og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur havt sáttmálakrøv um undantøk. Tó er ikki borið á mál hesum viðvíkjandi. Harumframt hava kjak og trætur um undantøk – ella vantandi undantøk fylt almenna rúmið, og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur í tveimum umførum borið fram síni sjónarmið um hesi viðurskifti.

Gerðarrætturin tók støðu til tvey trætumál um undantøk, og eftirfylgjandi vóru fleiri trætur um undantøk á Almannaverkinum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Undan arbeiðssteðginum hjá Føroya Pedagogfelag var Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar í verkfalli, og á heysti 2018 var Ljósmøðrafelagið í verkfalli. Undir báðum verkføllum vóru vantandi undantøk ein stór avbjóðing hjá Fíggjarmálaráðnum og avvarðandi arbeiðsgevarum.

Undanfarna árið hevur verið eitt samráðingarár burturav. Starvsfólkini hava tikið lut á óvanliga nógvum samráðingarfundum við fleiri fakfeløg. Í fleiri umførum hava nevndarlimir felagsins eisini tikið lut í samráðingunum, kanska serliga móti endanum, tá gerast skuldi av, um samráðingarnar fóru at bera á mál.

At samráðast við fakfeløgini á kommunala arbeiðsmarknaðinum má sigast at verða kjarnuuppgáva felagsins – ein uppgáva, sum felagið eigur at røkja væl. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur eisini eina uppgávu í at vegleiða og upplýsa kommunalu arbeiðsgevarunum í øllum málum viðv. løn- og setanarviðurskiftum hjá starvsfólkunum – ein uppgáva, sum felagið raðfestir við m.a. at seta á skrá ymisk upplýsandi tiltøk, evnisdagar, sáttmáladagar o.t.



*Tjørnuvík*

## Barnaverndarstovan

Ein av kjarnuuppgávunum hjá Barnaverndarstovuni er at tryggja børnum og ungum eitt gott grundarlag at standa á í lívinum. Barnaverndararbeiðið er tí ítøkiliga at gáa eftir, hvørji børn ikki fáa nøktandi umsorgan heima við hús, og at viðgera fráboðanir um slík børn. Síðan setir hvør einstøk barnaverndartænasta neyðugar fyriskipanir í verk og eftirmetir tær javnan.

Barnaverndarstova Føroya vegleiðir og arbeiðir fyri at styrkja og samskipa barnaverndarvirksemið í øllum landinum. Hetta merkir, at tey átta barnaverndarøkini fáa ta ráðgeving og tann stuðul, sum tey hava fyri neyðini í málum, sum eru trupul at handfara.

Mest vanligu fyriskipanirnar verða játtaðar sambært § 15 í lógini, sum stuðla barninum og foreldrunum í eitt tíðarskeið. Tað kemur tó javnan fyri, at barnið má fara úr heiminum í styttri ella longri tíð, meðan arbeitt verður við nøkrum grundleggjandi viðurskiftum. Tá so er, er tað altíð ein avbjóðing at finna eitt annað heim til barnið – ella møguliga eitt pláss á einum stovni í eina tíð.

## Fosturforeldraskipanin

Tá avgerð er tikin um, at eitt barn skal verða sett heiman, royna barnaverndartænasturnar fyrst at finna fosturfamiljur í familjuni ella í netverkinum hjá barninum. Um hetta ikki letur seg gera, er neyðugt at finna fosturfamilju uttanfyri familjuna og netverkið hjá barninum.

Ein av uppgávunum hjá Barnaverndarstovuni er at gera og røkja eina skrá yvir fosturforeldur, sum skulu vera tøk at taka ímóti einum barni, og at fyrireika hesi til uppgávuna. Men hóast Barnaverndarstovan javnan søkir eftir fosturfamiljum í sosialu miðlunum, er torført at finna familjur, sum ynskja at gerast fosturforeldur, serliga í høvuðsstaðarøkinum. .

Ein serritgerð í sálarfrøði er skrivað um trivnaðin hjá fosturmammum í Fosturforeldraskipanini, sum hava børn við viðgerðarkrevjandi sálarligum avbjóðingum til fosturs. Kanningin vísir, at trivnaðurin hjá hesum fosturmammum ikki er nøktandi, og at staðfestast tí má, at Fosturforeldraskipanin ikki er gjørd til fosturbørn við ov stórum avbjóðingum. Avgjørt er at hyggja nærri eftir hesi avbjóðing.

Ein uppfylgjandi kanning er síðani gjørd um trivnaðin hjá føroyskum fosturforeldrum sum heild. Kanningin vísir, at fosturfamiljurnar í Føroyum eru væl nøgdar við Fosturforeldraskipanina. Tær fosturfamiljur, ið trívast serstaka væl í leiklutinum sum fosturforeldur, hava eitt tætt og regluligt samband við Fosturforeldraskipanina og barnaverndartænastuna. Tískil er týdningarmikið, at vit halda fast í hesum stevnumiði.

## Menning og hagtøl

Seinnu árini hevur Barnaverndarstovan raðfest arbeiðið at gera leiðreglur til barnaverndartænasturnar, sum tær kunnu styðja seg til í málsviðgerðini. Ein partur av hesum arbeiði er at leggja eina handbók til rættis, sum lýsir ymsu stigini í einum barnaverndarmáli við atliti at lógarheimildum og ymsum ásetingum annars.

Barnaverndarstovan skipar støðugt fyri fakligum skeiðum, ið venda sær til fólk, sum arbeiða við børnum, ungum og vaksnum, ið hava verið fyri vansorgan. Eins og undanfarna ár eru fleiri sonevnd *mentaliseringsskeið* hildin. Undirtøkan hevur verið góð, og skeiðini hava økt um fakliga tilvitið hjá starvsfólkum á økinum.

Barnaverndarstovan skal eisini savna inn og gera hagtøl um virksemið hjá barnaverndartænastunum kring landið. Hagtølini vísa nógvar áhugaverdar tættir í barnaverndararbeiðinum, og hvat arbeiðið í høvuðsheitum fevnir um.. Nú hagtalsskipanin hevur verið virkin í eitt



**Barnaverndarmál**



áramál, kunnu tølini eisini nýtast sum grundarlag undir nærri útgreiningum og gransking av virkseminum. Øll hagtøl eru at finna á heimasíðuni hjá Barnaverndarstovuni.

## Barnahúsið

Barnahúsið, sum Barnaverndarstovan hevur ábyrgdina av, hevur nú vikað í fimm ár. Tíðin hevur greitt víst, at tørvur er á einum staði sum hesum, har tvørfakligt arbeiði er viðvíkjandi børnum og avvarðandi í málum um harðskap, og har kynsligur ágangur er farin fram. Fíggjargrundarlagið undir Barnahúsinum er ein árlig játtan frá Almannamálaráðnum. Hugsjónin við Barnahúsinum er hin sama, sum hjá barnahúsum í hinum Norðurlondunum, har atliti til barnið er fremst. Avvarðandi myndugleikar møta barninum í Barnahúsinum, og partarnir gera í mest møguligan mun sítt arbeiði inni í Barnahúsinum. Við tað at Barnahúsið er skipað eftir sama leisti sum stovnar av sama slagi í Danmark, halda vit tað vera skilagott at savna hagtøl og flokka tey á sama hátt, sum gjørt verður har, tí so ber til at samanbera tvørtur um landamørk. Hagtølini vísa okkum, at títtleikin av ágangi móti børnum í Føroyum líkist tølunum, vit síggja í Danmark.

## Fyribyrgjandi arbeiði við børnum og ungum

Í summar eru tíggju ár síðani, at partarnir í SSP samstarvinum skrivaðu undir fyrsta sáttmálan, ið var grundarlagið at fara til verka. Hettar tvørprofessionella samstarv millum kommununar, landið og politi, at basa lógarbrotum millum børn, varð sett í verk við íblástri úr Danmark, har SSP hevur sín uppruna. Í 2010 var farið ítøkiliga til verka at skipa átøkini. og hava vit reguliga skipa fyri fundum fyri foreldur við teirri sannroynd, at tey eru týdningarmesti samstarvsfelagin, tá ið talan er um fyribyrging.

Spurningurin er, um skipanin hevur virkað eftir ætlan. Hyggja vit at hagtølunum hjá politinum, er gongdin greið. Í 2006 vóru 96 mál viðvíkjandi ungum millum 15 og 18 ár, og í fjør var talið 40. Ein gongd er, at talið av málum við harðskapi støðugt minkar. Í fjør vóru eingi mál um harðskap fráboðað. Ung undir 15 ár, ið ikki kunnu skuldsetast, koma stundum í samband við poltiið. Tá er ofta talan um ófantaligan atburð á sosialu miðlunum ella óhóskandi myndir, ið verða sendar í umferð. Hettar er brót á lógina. Tá verður í flestu førum skipað fyri fyribyrgjandi samrøðum við tann unga, har foreldrini eru hjá.

## Fráboðað lógarbrot hjá ungum

Sjálvt um gongdin er jalig, mugu vit ásanna, at ein partur av okkara børnum og ungum stríðast og mistrívast í lívinum, meira enn hvat gott er. Við støði í viðurkendari gransking mugu vit rokna við, at eini 2.500 børn og ung í Føroyum kundu haft tað betur. Fyri nógv at teimum er tað ikki brástøða, men ringu umstøðurnar hava verið partur av teirra lívi frá heilt ungum árum. Við hesum í

**Fráboðað lógarbrot hjá ungum**





huga tóku partarnir í samstarvinum undir við, at SSP í dag fevnir um børn og ung frá 0 til 18 ár. So nú eru umstøður at skipa fyribyrgjandi átøk á kommunala geiranum tvørtur um kommunumørk. Kommunurnar hava buktina um báðar endar og kunna gera nakað munagott, tí tær eiga dagstovnarnar, forskúlarnar, frítíðarskúlarnar og ungdómshúsini. Vit vita, hvussu stóran týdning tey, ið arbeiða í fyrstu røð og eru dagliga saman við við børnunum, hava.

Fyri at tryggja, at øll børn og ung koma væl undan, er neyðugt at hugsavna seg um hugburð, og hvussu vit røkka teimum, ið eru fyri vanbýti og ikki rættiliga sleppa við upp í part. Vit, ið skulu kveikja og slóða fyri munagóðum fyribyrgjandi átøkum, hava brúk fyri, at politiska skipanin, bæði land og kommunur, seta ítøkilig MÁL OG MIÐ á økinum. Hettar finst ikki í dag, og er ein bági fyri at skipa tvørprofessionella fyribyrgjandi arbeiðið til gangs fyri børn, ung og familjurnar og samfelagið sum heild.

# Betri samstarv millum land og kommunur

Fyrst í 2019 gav Løgmansskrivstovan út nýtt rundskriv um lógarsmíð. Talan er um eitt umfatandi og væl gjøgnumarbeitt verk, ið viðger allar tættir í tilgongdini frá hugskoti til lidna lóggávu.

Í hesum rundskrivi er eitt brot, nevnt lóggáva í mun til kommunurnar, har stjórnarrættarliga støðan hjá kommunum verður lýst, og greitt verður frá teimum kørmum, sum føroysku kommunurnar virka undir, og hvussu lóggevast skal í mun til kommunurnar. Kommunufelagið vónar, at hetta kann vera við til at upplýsa starvsfólk í landsfyrisitingini um kommunala sjálvræðið, og hvønn týdning hetta hevur í lóggávuarbeiði og umsiting av lóggávuni.

Kommunufelagið fegnast eisini um, at sum part av tilgongdini við at bøta um samstarv millum land og kommunur, hevur tað í ávísan mun eydnast at fáa í lag fastar og afturvendandi fundir við Løgmansskrivstovuna, sum yvirskipað samskipar lóggávuarbeiði, ið landsstýrið fyrireikar. Somuleiðis eru afturvendandi fundir á skrá við onnur aðalráð um viðurskifti av felags áhuga.

Rætturin at gera sína ávirkan galdandi, at verða hoyrdur, og at geva ummæli eru hornasteinar í einum framkomnum fólkaræði. Tað er umráðandi at hesir partar av lóggávutilgongdini verða virdir og gerast eins sjálvsagdir og aðrir tættir í tilgongdini.

Ein táttur í lóggávutilgongdini, sum er nevndur í rundskrivinum, er, at aðalráð seta arbeiðsbólkar at koma við tilmælum um broytta ella nýggja lóggávu. Kommunufelagið tekur javnan lut í ymsum arbeiðsbólkum viðvíkjandi økjum, sum hava kommunalan áhuga ella ávirka kommunala geiran, og røkir harvið áhugamálini hjá kommununum.

Hinvegin kunnu vit staðfesta, at í hesum valskeiði, eins og undanfarnum, hevur afturvendandi trupulleikin verið, at hoyringsrætturin mangan bara hevur verið eitt eiti, í



ávísum førum er talan um nakrar heilt fáar dagar og í einstøkum førum hevur als eingin hoyring verið. Hetta er als ikki nøktandi og má broytast.

Í nevnda rundskrivi um lógarsmíð verður mælt til, at ummælisfreistin er minst 4 vikur, tá lógaruppskot verða send til hoyringar, og aftur minst 4 vikur tá uppskot verða sent til endurummælis.

At hoyringsfreistir ikki verða virdar er ein avleiðing av sjálvum trupulleikanum, sum stavar frá ov tilvildarligum fyrisitingarligum og politiskum arbeiðslagi. At mæla til í einum rundskrivi at hava eina hoyringarfreist á minst 4 vikur er eitt stig á leiðini at fáa bøtt um henda trupulleikan, men Kommunufelagið metir, at ummælisrætturin átti at verið betri kjølfestur í lóggávutilgongdini. Spurningurin er, um ikki tað einasta rætta er at broyta grein 57 í tingskipanini, soleiðis at løgtingsformaðurin eisini skal kunna mæla Løgtinginum til at vísa burtur uppskoti, um ummælisfreistin ikki er hildin. (Sí talvu um hoyringsfreistir á síðu 21).

## At enda

Eingin ivi er um, at áhugamálini hjá kommununum eru best tryggjað í einum savnaðum og sterkum kommunufelagsskapi sum okkara. Og vit mugu ásanna, at tørvurin á einum sterkum felagsskapi er størri nú enn nakrantíð áður. Til tíðir kann tað vera ein avbjóðing at finna neyðugu semjurnar, men tað er í roynd og veru bara tekin um, at lív er í í einum so breiðum felagsskapi, sum Kommunufelagnum.

Umráðandi er, at landsmyndugleikin bert hevur eitt og sama felag at venda sær til, tá um kommunuviðurskifti ræður. Tað bøtir munandi um samskiftið, men hevur eisini sera stóran týdning fyri samráðingarstøðuna hjá kommununum – tí saman standa vit sterkari, lat ongan iva vera um tað.

Mín vón er tí, at tann samstarvsandi, sum hóast nakrar ósemjur hevur eyðkent føroysku kommunurnar í nógv ár, heldur áfram og við tíðini kann gerast uppaftur sterkari

Tað gongur væl í Føroyum. Búskapurin hevur sjáldan verið so góður, og alsamt fleiri velja Føroyar. Størsta avbjóðingin hjá okkum er í dag at hýsa øllum, skipa karmar um tryggar starvsmøguleikar, og í felag – og sjálvboðið – ansa eftir, at vit ikki seta so nógva ferð á, at vandi er fyri, at vit snýsa alt omanav. Tað verða brotasjógvar komandi árini. Vælferðarsamfeløg kring allan heim hava stórar avbjóðingar, tí krøv og væntanir eru so umfatandi, samstundis sum vit verða færri at bera útreiðslurnar.

Tí hevur ongantíð verið so neyðugt sum í dag, at vit standa saman, halda fast við áræðið og við at vilja finna loysnirnar, sum ikki bara lætta og linna í løtuni, men sum í longdini bera alt samfelagið longur fram á leið. Vit skulu støðugt minna okkum sjálvi á, at í longdini er tað opna, virðiliga samskiftið hvassasta svørðið – og vit mugu gera alt, sum stendur í okkara makt, fyri at venja landsmyndugleikarnar til sama hugburð.

# Skjøl til formansfrágreiðingina

**Mynd 1:** Vallutøka í 2008, 2012 og 2016



Framhald **mynd 1**

| Kommunur | 2008 | 2012 | 2016 |
|---|---|---|---|
| Eiðis kommuna | 86.6 | 87.82 | 88.2 |
| Eystur kommuna | 84.4 | 88.6 | 87.8 |
| Fámjins kommuna | 88 | 83.72 | 95.9 |
| Fuglafjarðar kommuna | 84.7 | 84.96 | 90 |
| Fugloyar kommuna | 86.4 | 94.44 | 97.8 |
| Hovs kommuna | 82.8 | 74.76 | 89.5 |
| Húsar kommuna | 95.2 | 74.36 | – |
| Húsavíkar kommuna | 78.5 | 86.54 | 96.8 |
| Hvalbiar kommuna | 84 | 81.93 | 90.2 |
| Hvannasunds kommuna | 79.3 | 79.02 | 87.9 |
| Klaksvíkar kommuna | 81.9 | 82.04 | 87.4 |
| Kunoyar kommuna | 95 | 80.2 | 86.4 |
| Kvívíkar kommuna | 77.1 | 77.7 | 78.6 |
| Nes kommuna | 84.6 | 84.19 | 85.9 |
| Porkeris kommuna | 93.2 | 91.02 | 95.7 |
| Runavíkar kommuna | 79.8 | 79.36 | 85.6 |
| Sands kommuna | 91.1 | 92 | 94.3 |
| Sjóvar kommuna | 76.9 | 81.08 | 82.2 |
| Skálavíkar kommuna | 82.6 | 77.78 | 85.5 |
| Skopunar kommuna | 83.5 | 87.04 | 92.2 |
| Skúvoyar kommuna | 83.6 | 88.37 | 78.4 |
| Sumbiar kommuna | 90.1 | 89.8 | 89.3 |
| Sunda kommuna | 80.5 | 79.01 | 85.3 |
| Sørvágs kommuna | 84 | 83.05 | 83.6 |
| Tórshavnar kommuna | 72.4 | 77.37 | 79.2 |
| Tvøroyrar kommuna | 82.6 | 83.33 | 90.1 |
| Vága kommuna | 82.4 | 82.21 | 84.5 |
| Vágs kommuna | 80 | 81.92 | 87.8 |
| Vestmanna kommuna | 75 | 77.11 | 83.1 |
| Viðareiðis kommuna | 89.2 | 90.43 | 92.9 |

**Mynd 2** Fólkatalið í sýslununum 1900 til 2019, útvald ár

Fólkatalið í sýslunum í Føroyum 1900 til 2018, útvald ár

| Sýsla | 1900 | 1925 | 1950 | 1975 | 2000 | 2018 | 2019 | Vøkstur síðani 2000 | Seinasta árið |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoya Sýsla | 1.763 | 2.644 | 4.448 | 5.655 | 5.810 | 6.063 | 6.143 | 333 | 80 |
| Eysturoyar Sýsla | 3.440 | 5.243 | 6.988 | 8.831 | 9.995 | 11.267 | 11.125 | 1.530 | 258 |
| Streymoyar Sýsla | 4.199 | 6.195 | 9.728 | 17.982 | 20.531 | 24.033 | 24.536 | 4.005 | 503 |
| Vága Sýsla | 1.417 | 2.102 | 2.637 | 2.762 | 2.614 | 3.233 | 3.289 | 675 | 56 |
| Sandoyar Sýsla | 1.178 | 1.510 | 1.712 | 1.700 | 1.445 | 1.285 | 1.273 | -172 | -12 |
| Suðuroyar Sýsla | 3.027 | 5.141 | 6.268 | 5.685 | 4.958 | 4.613 | 4.593 | -365 | -20 |
| Føroyar | 15.024 | 22.835 | 31.781 | 42.615 | 45.353 | 50.494 | 51.359 | 6.006 | 865 |

**Mynd 2b** Fólkavøkstur síðani 2000




**Mynd 2c** Seinasta árið




**Mynd 2d** Fólkatal 1900 til 2019



**Mynd** 3 Kommunuskattaprosentið og barnafrádráttir í 2012 og 2018

| 2019 | Kommunu-skattur í % | Barna-frádráttur | 2012 | Kommunu-skattur í % | Barna-frádráttur | Munur, kommunu-skatt % | Munur, Barnafrá-dráttur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fugloyar | 16 | 10.000 | Fugloyar | 16 | 7.000 | 0 | 3.000 |
| Viðareiðis | 20.5 | 7.500 | Viðareiðis | 21.2 | 4.500 | -0.7 | 3.000 |
| Hvannasunds | 19.75 | 7.000 | Hvannasunds | 20.5 | 5.000 | -0.75 | 2.000 |
| Klaksvíkar | 20.75 | 5.500 | Klaksvíkar | 21.75 | 4.000 | -1 | 1.500 |
| Kunoyar | 18.5 | 7.000 | Kunoyar | 18 | 4.000 | 0.5 | 3.000 |
| Fuglafjarðar | 21.5 | 6.500 | Fuglafjarðar | 21.5 | 4.500 | 0 | 2.000 |
| Eystur | 21 | 8.000 | Eystur | 21 | 5.000 | 0 | 3.000 |
| Nes | 20.5 | 5.500 | Nes | 20.5 | 5.000 | 0 | 500 |
| Runavíkar | 22 | 8.000 | Runavíkar | 22 | 4.500 | 0 | 3.500 |
| Sjóvar | 21 | 7.000 | Sjóar | 21.5 | 4.500 | -0.5 | 2.500 |
| Eiðis | 18.75 | 7.500 | Eiðis | 21 | 6.000 | -2.25 | 1.500 |
| Sunda | 21.5 | 5.000 | Sunda | 21.5 | 5.000 | 0 | 0 |
| Kvívíkar | 20.75 | 5.100 | Kvívíkar | 21 | 4.000 | -0.25 | 1.100 |
| Vestmanna | 21.5 | 5.000 | Vestmanna | 23 | 4.000 | -1.5 | 1.000 |
| Vága | 22 | 5.500 | Vága | 22.5 | 4.000 | -0.5 | 1.500 |
| Sørvágs | 21.7 | 6.000 | Sørvágs | 21 | 4.000 | 0.7 | 2.000 |
| Sands | 21 | 8.500 | Sands | 23.5 | 6.000 | -2.5 | 2.500 |
| Skopunar | 21.75 | 6.000 | Skopunar | 23.5 | 6.000 | -1.75 | 0 |
| Skálavíkar | 22 | 7.000 | Skálavíkar | 21 | 5.500 | 1 | 1.500 |
| Húsavíkar | 21 | 6.000 | Húsavíkar | 21 | 5.000 | 0 | 1.000 |
| Skúvoyar | 16 | 8.000 | Skúvoyar | 16 | 3.000 | 0 | 5.000 |
| Hvalbiar | 19.85 | 6.500 | Hvalbiar | 20 | 5.000 | -0.15 | 1.500 |
| Tvøroyrar | 20.9 | 7.000 | Tvøroyrar | 23.5 | 5.000 | -2.6 | 2.000 |
| Fámjins | 17 | 7.000 | Fámjins | 19 | 6.000 | -2 | 1.000 |
| Hovs | 20 | 6.000 | Hovs | 20.5 | 5.000 | -0.5 | 1.000 |
| Porkeris | 20.75 | 7.000 | Porkeris | 21 | 5.500 | -0.25 | 1.500 |
| Vágs | 21.95 | 4.500 | Vágs | 23.25 | 4.000 | -1.3 | 500 |
| Sumbiar | 19 | 6.500 | Sumbiar | 20 | 5.500 | -1 | 1.000 |
| Tórshavnar | 19 | 8.000 | Tórshavnar | 20.75 | 5.500 | -1.75 | 2.500 |
| Hægsta | 22 | 10.000 | Hægsta | 23.5 | 7.000 | -1.5 | 3.000 |
| Meðal | 20.19 | 7.071 | Meðal | 21.34 | 4.956 | -1.15 | 2.115 |
| Lægsta | 16 | 4.500 | Lægsta | 16 | 3.000 | 0 | 1.500 |

# Løgtingsmál til hoyringar hjá KF:

| Skrásett | Uppskot | Slag | Frá |
|---|---|---|---|
| 2/15/2018 | Andstøðuuppskot á tingi várið 2018 | LB | HIMR |
| 3/18/2018 | Borgarstjóri í øðrum starvi | LB | Løgtingið |
| 4/6/2018 | Náttúrumargfeldi | LL | UVMR |
| 4/19/2018 | Posta, um einskiljing | LL | UVMR |
| 5/1/2018 | Ferðavinnumenning, um stuðul | KG | HIMR |
| 6/2/2018 | Sernámsfrøðilig tiltøk og Heima- og sjúkraundirvísing | KG | MMR |
| 6/7/2018 | Málsøkið persóns-, húsfólka- og arvarættur | KG | Løgtingið |
| 6/22/2018 | Kortmyndugleikar, um yvirtøku | RL | UVMR |
| 6/28/2018 | Matstovulógin, broyting viðv. skeinking otl | LL | UVMR |
| 7/11/2018 | Sigling við ferðamannaskipum | KG | UVMR |
| 7/12/2018 | Sundhedsloven | KG | SMR |
| 7/16/2018 | Vatnskutarar, førleikakrøv og ferðaavmarkingar | KG | UVMR |
| 7/23/2018 | Vælferðarpakkin | LL | AMR |
| 8/9/2018 | Arbeiðsskaðatrygging, uppgávuflyting millum stovnar | LB | SMR |
| 8/13/2018 | Kærunevnd í lendismálum | LB | SMR |
| 9/17/2018 | Pedagoghjálparaútbúgving v.m. | LL | MMR |
| 10/11/2018 | 3 mál um bústaðir, andstøðuuppskot | LL | Løgtingið |
| 10/25/2018 | Talgildur Samleiki | LL | FMR |
| 10/29/2018 | Tilhaldslógin | LB | Tinganes |
| 10/30/2018 | Fósturforeldrar og eftirløn | KG | UVMR |
| 11/15/2018 | Leingjan av rættinum til barsilspening | LB | Tinganes |
| 12/7/2018 | Musikkskúlaskipanin | KG | HIMR |
| 12/18/2018 | Bústaðarpakkin hjá landinum Anno 2018 | LB | HIMR |
| 12/20/2018 | Alibrúk - stovnsetan, aliloyvi - tillutan og útbjóðing | KG | SMR |
| 12/21/2018 | Skipan av serflokkum í fólkaskúlanum | KG | MMR |
| 12/22/2018 | Fólkaskúlin, samanlegging, samstarv og 10 flokk | LB | MMR |
| 12/22/2018 | Revsilógin, dagføring | LB | MMR |
| 1/7/2019 | Savnsvirksemi landsins | LL | MMR |
| 1/11/2019 | Virkisskrá | LL | HIMR |
| 1/15/2019 | Landslæknin, yvirtøka av málsøki | LB | HIMR |
| 1/16/2019 | Heilsutænastur í nærumhvørvinum | LL | FMR |
| 1/29/2019 | Útbjóðing av rakstri | LB | AMR |
| 1/29/2019 | Tolllógin | LB | HIMR |
| 1/29/2019 | Ferðslulógin, koyring og hvíld | LB | AMR |
| 2/12/2019 | Veiðigjald | LL & KG | FISK |

**Hoyringsfreistir**









# Ískoyti 1: Eldraøkið

Í januar 2015 yvirtóku kommunurnar og kommunalu samstørvini umsitingina og fíggingina av eldraøkinum. Til hetta varð avtalaður ein fíggingarleistur, har kommunurnar fingu fleiri inntøkur, sum skuldi til fyri at reka eldraøkið. Í sama tíðarskeiði er fráflyting broytt til tilflyting og nú góð 4 ár eru síðani yvirtøkuna verður her roynt at hyggja eftir økinum. Í tí sambandi verður hugt eftir bæði útreiðslum og inntøkum innan eldraøkið og gongdini í fólkasamansetingini í ymsu økjunum, síðan yvirtøkuna fyri góðum 4 árum síðani.

Tá eldraøkið varð lagt til kommunurnar í 2015, varð ásett, at løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. skuldi eftirmetast eftir fimm árum, t.e. í 2020.

Landsstýriskvinnurnar, Eyðgunn Samuelsen, Sirið Stenberg og Kristina Háfoss fráboðaðu í tíðindaskrivi dagfest 4. desember 2017, at eftirmetingin skuldi gerast longu fyrst í 2018.

Serliga vóru tað afturberingarleisturin, markamótini millum land og kommunur, kommunalu samstarvsøkini, sum skuldu eftirmetast, og hetta skuldi gerast í tøttum samstarvi millum land og kommunur. Higartil er lítið og einki hent hesum viðvíkjandi.

## GONGDIN Í FÓLKASAMANSETINGINI (DEMOGRAFIIN)

Eldraøkið bleiv yvirtikið í einari demografiskari broytingartíð. Búskaparráðið hevur í sínum greiningum av fíggjarliga haldførinum víst, at vit gerast alsamt fleiri eldri, meðan talið av fólkið á arbeiðsmarkninum er í minking. Hesar framrokningar vórðu gjørdar í 2015, og síðani tá er tilflytingin til Føroyar vaksin og fólkatalið vaksið við heili 3000 fólkum. Hóast tilflytingin til Føroyar í mestan mun er fólk í arbeiðsførum aldri, er gongdin hin sama.

**Mynd 1:** Lutfall millum fólk 16–66 ár og fólk 67 ár og yvir (alt landið)




**Mynd 2:** Lutfall millum fólk 16–66 ár og fólk 67 ár og yvir (býtt á øki)



Mynd 1 vísir gongdina í lutfallinum millum fólk í arbeiðsførum aldri og fólk í pensiónsaldri. Sum sæst, so hevur lutfallið verið støðugt fallandi síðani 2014 frá knøppum 4,5 til beint undir 4,1 fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist. Hetta er, hóast stóra tilflyting og vøkstur í talið av fólki í arbeiðsførum aldri. Orsøkin er lutfalsligi stóri vøksturin á 13 % av eldri fólki, sum eru 67 ár ella eldri. Hetta kemst bæði tí, at fólk liva longri, men eisini tí, at talan er um stórar árgangir frá eftirkrígsárunum, sum í dag gerast pensjónistar.

Áhugavert er at viðmerkja, at framrokningarnar hjá búskaparráðnum, sum blivu gjørdar fyri skjótt fýra árum síðani, vísa seg stórt sæð at vera óávirkaðar av positivu fólkatalsgongini annars.

Hyggja vit eftir, hvussu gongdin er kring landið, síggja vit, at hóast stórur munur er á, er yvirskipaða gongdin hin sama.

Mynd 2 vísir lutfallið millum fólk í arbeiðsførum aldri og fólk í pensjónsaldri í teimum ymsu økjunum í Føroyum. Suðurstreymoyarøkið er lutfalsliga best fyri, har lutfallið millum aldurbólkarnar 16-66 ár og 67+ er fallið frá 5,2 í 2014 til 4,6 í 2018. Í Sandoy og Suðuroy er lutfallið eisini fallandi, men støðið er eitt heilt annað. Í Suðuroy er lutfallið fallið frá 3,6 til 3,1, meðan tað í Sandoynni nú bert eru 2,8 fólk í arbeiðsførum aldri til hvønn pensjónist. Í restini av Føroyum er gongdin eisini fallandi, har tað í dag eru um 4 fólk millum 16 og 66 fyri hvønn pensjónist.

Man kann siga, at landið í so máta er brotið í trý, har Sandoyggin og Suðuroyggin eru lutfalsliga ringast fyri, suðurstreymur er best fyri, meðan restin av landinum liggur einastaðni mitt ímillum.

## KOSTNAÐURIN AV ELDRAØKINUM.

So hvørt, sum talið av eldri borgarum veksur, veksur eisini tørvurin á útreiðslum til eldraøkið. Hyggja vit eftir samlaðu rakstrarútreiðslunum til eldraøkið, eru tær eisini vaksnar síðani 2015, tá eldraøkið bleiv yvirtikið.

Í yvirlitinum hyggja vit bert at rakstrar- og lógarbundu játtanunum, meðan íløgurnar eru tiknar burturúr, fyri at gera samanberingarnar yvir ár.

Raksturin fer fram í samstørvunum og íløgurnar í stóran mun í kommununum. Fleiri av samstøvunum leiga hølir frá kommunum og tískil skal samansetingin av rakstrinum fyri og eftir 2015 takast við fyrivarni, tí møguliga bruttofiseringar gera, at kostnaðurin kunstiga er øktur, uttan at nakað reelt er hent.

Talva 1 vísir rakstrarútreiðslurnar hjá kommunalu samstørvunum til eldrarøkt. Árini 2015 til 2017 er rakstarkostnaðurin av eldraøkinum vaksin við á leið 40 mió. krónum, so hann nærkast hálvari mia. Men samstundis er talið av eldri fólki eisini vaksið.

Við at býta útreiðslurnar út á hvønn borgara, sum er fyltur 67 ár, síggja vit, at útreiðsluvøksturin kann forklárast beinleiðis út frá vøkstrinum í tali av eldri fólki. Miðal kostnaðurin fyri alt landið hevur ligið um 61-62.000 kr. fyri hvønn pensjonist.

Um vit hyggja eftir, hvat eldraøkið kostaði, áðrenn tað bleiv lagt út, síggja vit, at samlað sæð er talan um ein niveau-shift, har eldraøkið nú kostar knappar 10.000 kr. meira um árið pr. pensjónist. Mynd 3 vísir samlaðu útreiðslurnar til eldraøkið hjá landi og kommunum árini 2011 til 2017. Árini fram til 2014 var samlaði rakstrarkostnaðurin fyri eldrarøkt góðar 50 túsund krónur fyri hvønn, um útreiðslurnar vera býttar á allar borgarar í pensjónsaldri. Eftir 2015 hækkar hesin kostnaðurin til oman fyri 60 túsund krónur fyri hvønn. Hetta kann benda á, at kommunurnar hava uppraðfest økið, síðan tað bleiv yvirtikið í 2015, men ávís fyrivarni skulu takast við hesi samanbering. Tølini eru tikin frá búskaparskipan landsins, og møguliga eru framdar bókhaldsligar broytingar, har útreiðslur, sum áður ikki vórðu bókaðar innan eldrarøkt, eru fluttar til økið.

**Mynd 3:** Kostnaður pr. borgara yvir 67 ár



## TALVA 1 ÚTREIÐSLUR

Á talvuni niðanfyri síggjast útreiðslurnar fyrstu 4 árini samanlagt, og fyri tey 8 eldraøkini hvør sær. Útreiðslurnar er hækkaðar við góðum 70 mió. kr. fýra tey fyrstu árini. Samanlagt ein vøkstur á 17 %.

Vøksturin er eins stórur í øllum økjum. Í Veks samstarvinum og Suðuroynni er vøksturin 10 %, ímeðan vøksturin í Tórshavn og Sandoynni er uppá 22 %. Sum omanfyri skulu eisini ávís fyrivarni takast í mun til útreiðslurnar. Innanhýsis flytingar ímillum samstørv og kommunur, so sum leigukostnaður á uml. 11 mió. kr. eru partar av samlaðu útreiðslunum.

## TALVA 2 INNTØKUR

Á talvuni niðanfyri síggjast samlaðu inntøkurnar fyrstu 4 árini. Samlaðu inntøkurnar eru vaksnar við uml. 50 mió. kr. Verður sæð burtur frá tíðaravmarkaðu upphæddini tvey tey fyrstu árini, so er vøksturin úti við 75 mió. kr.

Skattur frá pensjónsinngjøldum, sum verður býttur út til kommunurnar eftir talið av eldri borgarum yvir 67 ár, er bulurin í fíggingini av eldraøkinum. Økingin, sum líðandi kemst av, at fólk rinda meira inn til pensjón merkir eisini, at kommunurnar so líðandi fáa fleiri inntøkur frá pensjónsskatti. Fyrstu 4 árini er vøksturin í pensjónsskatti úti við 75 mió. kr. Higartil í 2019 er vøksturin í inntøkum frá pensjónsskatti heili 19 %.

Fyri at javna grundarlagið millum kommunur, var ein afturberingarskipan annar parturin av fíggingarleistinum, soleiðis at kommunur fáa endurgjald vegna frádráttir og serskipanir, sum gera, at borgarar í kommununum ikki rinda kommunuskatt. Hendan upphæddin hevur verið støðug tey fyrstu fýra árini, millum 112 og 115 mió. kr.

## TALVA 3 SAMANLAGT

Í talvuni niðanfyri sæst munurin millum inntøkur og útreiðslur fýra tey fyrstu árini. Um sæð verður burtur frá tíðaravmarkaðu inntøkunum hjá kommununum tvey tey fyrstu árini, so hevur undirskotið hjá kommununum ligið ímillum 32 og 44 mió. kr.,

Kommunurnar høvdu frammanundan, at eldraøkið var yvirtikið, útreiðslur á økinum. Millum annað høvdu kommunurnar útreiðslur til ymiskar tænastur, so sum mattænastu, dagtilhald v.m. Eisini fíggjaðu kommunurnar útreiðslurnar til náttarvaktina á øllum sambýlum í landinum. Hesar útreiðslur vóru samanlagt omanfyri 10 milliónir kr. Harumframt eru leigugjøld kommunurnar ímillum eisini partur av samlaðu útreiðslunum. Hesar eru eisini omanfyri 10 mió. kr. um árið. Hinvegin hava kommunurnar í samband við fíggingarleistin eisini mist inntøkurnar frá skattinum á kapitalpensjónum. Upphæddin hevur verið uml. 16 mió. kr. um árið, fyrstu fýra árini.

Hóast ávís fyrivarni, so kann staðfestast, at fyri kommunurnar samanlagt, eru útreiðslurnar hægri enn inntøkurnar.

**Talva 1**

| Øki/ár | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Index fyri vøkstur |
|---|---|---|---|---|---|
| NBH | 56.375.089 | 57.173.148 | 60.903.438 | 65.667.830 | 116 |
| Nánd | 32.777.000 | 33.168.000 | 32.963.000 | 37.549.000 | 115 |
| RODIN | 55.903.884 | 61.117.501 | 61.714.020 | 65.424.354 | 117 |
| VEKS | 38.553.686 | 41.108.151 | 42.619.603 | 42.593.919 | 110 |
| Vágar | 27.031.000 | 32.837.000 | 29.694.000 | 30.472.000 | 113 |
| TK | 153.486.914 | 162.496.346 | 173.364.818 | 187.479.530 | 122 |
| Sandoy | 14.673.313 | 15.981.037 | 16.333.623 | 17.932.154 | 122 |
| Suðuroy | 50.646.000 | 52.167.000 | 51.008.000 | 55.674.438 | 110 |
| Tilsamans | 429.446.886 | 456.048.183 | 468.600.502 | 502.793.225 | 117 |
| | | | | | |

**Talva 2**

| Intøkur/ár | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Index fyri vøkstur |
|---|---|---|---|---|---|
| Forskattur | 277.394.668 | 295.496.583 | 321.033.336 | 351.719.144 | 127 |
| DIS/FAS | 112.810.965 | 115.908.083 | 115.259.275 | 113.117.988 | 100 |
| Tíðaravmarkað | 25.000.000 | 13.300.000 | 0 | 0 | |
| Tilsamans | 415.205.634 | 424.704.666 | 436.292.611 | 464.837.132 | 112 |
| Uttan tíðaravmark | 390.205.633 | 411.404.667 | 436.292.611 | 464.837.132 | 119 |

**Talva 3**

| Ár | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|
| Samlað inntøka | 415.205.634 | 424.704.666 | 436.292.611 | 464.837.132 |
| Samlað útreiðsla | 429.446.886 | 456.048.183 | 468.600.502 | 502.793.225 |
| Úrslit | -14.241.252 | -31.343.517 | -32.307.891 | -37.956.093 |
| Uttan tíðaravmark | -25.000.000 | -13.000.000 | | |
| Úrslit uttan tíðarav. | -39.241.252 | -44.343.517 | -32.307.891 | -37.956.093 |

Onnur viðurskifti, sum ikki hava verið viðgjørd her, eru tey inntriv, sum landsstýrið hevur gjørt í mun til sjálvan fíggingarleistin og sum hava tikið burturav inntøkugrundarlagnum, og tær upp raðfestingar, sum kommunurnar sannlíkt hava gjørt hesi árini, ið økið hevur verið kommunalt.

Tær framrokningar, sum vórðu gjørdar undan yvirtøkuna bendu á, at fíggingarleisturin fyrstu árini fór at geva meira enn kostnaðurin av økinum var. Men eftir yvirtøkuna sæst, at kommunurnar brúka meira, enn roknað varð við.

Ein annar trupulleiki er, at nýggja Pensjónsnýskipanin lækkar skattin fyri pensjónsinngjøld frá 40% til millum 30 og 40 % fyri ávísar lønarflokkar, og samstundis lækkar kravið um egna uppsparing úr 15% til 12%. Mótrokningin í fólkapensjón fer helst at viðvirka til, at fleiri fara at spara minni upp til eftirløn. Hetta er eisini við til at undirgrava fíggingarleistin fyri eldraøkið. Útrokningar, sum gjørdar vórðu fyri fíggjarligu avleiðingarnar, taka ikki hædd fyri hesum atferðarbroytingum hjá borgaranum.

## TALVA 4 EINSTØKU KOMMUNURNAR

Talva 4 vísir, hvørjar inntøkur og útreiðslur einstøku

**Talva 4**

| Kommuna | Inntøkur, forsk. | Dis/FAS | Int. tilsam. | Útr. brutto | Inntøkur | Úrslit netto |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fugloyar kommuna | 407.822 | 197.004 | 604.826 | 622.772 | - | -17.946 |
| Viðareiðis kommuna | 2.175.050 | 1.289.004 | 3.464.054 | 3.321.450 | - | 142.604 |
| Hvannasunds kommuna | 2.673.499 | 1.095.996 | 3.769.495 | 4.082.615 | - | -313.120 |
| Klaksvíkar kommuna | 36.749.279 | 11.381.004 | 48.130.283 | 56.118.661 | - | -7.988.378 |
| Kunoyar kommuna | 996.898 | 633.996 | 1.630.894 | 1.522.331 | - | 108.563 |
| Húsa kommuna | - | - | | | - | |
| **Tilsamans NBH** | **43.002.547** | **14.597.004** | **57.599.551** | **65.667.829** | | **-8.068.278** |
| Fuglafjarðar kommuna | 11.373.698 | 2.781.996 | 14.155.694 | 17.695.491 | 671.736 | -2.868.061 |
| Eysturkommuna | 12.823.731 | 4.590.000 | 17.413.731 | 19.853.477 | 2.173.180 | -266.566 |
| Tilsamans | 24.197.429 | 7.371.996 | 31.569.425 | 37.548.968 | 2.844.916 | -3.134.627 |
| Nes kommuna | 7.567.361 | 3.092.004 | 10.659.365 | 11.856.841 | | -1.197.476 |
| Runavíkar kommuna | 27.052.182 | 6.915.000 | 33.967.182 | 42.134.130 | | -8.166.949 |
| Sjóvar kommuna | 7.204.852 | 2.840.004 | 10.044.856 | 11.433.382 | | -1.388.526 |
| Tilsamans | 41.824.395 | 12.847.008 | 54.671.403 | 65.424.354 | 0 | -10.752.951 |
| Eiðis kommuna | 4.848.548 | 1.620.996 | 6.469.544 | 6.605.144 | 624.150 | 488.550 |
| Sunda kommuna | 10.920.562 | 5.319.000 | 16.239.562 | 15.062.197 | 1.822.080 | 2.999.445 |
| Kvívíkar kommuna | 4.350.100 | 1.055.004 | 5.405.104 | 5.926.111 | - | -521.007 |
| Vestmanna kommuna | 11.011.190 | 3.245.004 | 14.256.194 | 15.000.467 | 1.681.920 | 937.647 |
| **Tilsamans** | **31.130.400** | **11.240.004** | **42.370.404** | **42.593.919** | **4.128.150** | **3.904.635** |
| Vága kommuna | 14.001.883 | 6.483.996 | 20.485.879 | 18.735.000 | | 1.750.879 |
| Sørvágs kommuna | 8.972.080 | 4.569.996 | 13.542.076 | 11.737.000 | | 1.805.076 |
| Tilsamans | 22.973.963 | 11.053.992 | 34.027.955 | 30.472.000 | | 3.555.955 |
| Sands kommuna | 6.420.928 | 1.608.000 | 8.028.928 | 7.438.523 | | 590.405 |
| Skopunar kommuna | 4.535.885 | 1.707.000 | 6.242.885 | 4.914.739 | | 1.328.147 |
| Skálavíkar kommuna | 2.238.489 | 966.996 | 3.205.485 | 2.523.785 | | 681.700 |
| Húsavíkar kommuna | 2.238.489 | 522.000 | 2.760.489 | 2.390.954 | | 369.535 |
| Skúvoyar kommuna | 647.984 | 27.996 | 675.980 | 664.154 | | 11.826 |
| **Tilsamans** | **16.081.774** | **4.831.992** | **20.913.766** | **17.932.154** | **0** | **2.981.612** |
| Hvalbiar kommuna | 5.890.760 | 1.806.996 | 7.697.756 | 8.194.777 | 362.100 | -134.921 |
| Tvøroyrar kommuna | 13.730.002 | 5.010.000 | 18.740.002 | 18.891.776 | | -151.774 |
| Famjins kommuna | 1.178.152 | 123.000 | 1.301.152 | 1.626.444 | | -325.292 |
| Hovs kommuna | 906.271 | 120.996 | 1.027.267 | 1.251.111 | 166.793 | -57.051 |
| Porkeris kommuna | 2.900.066 | 536.004 | 3.436.070 | 4.003.555 | 451.822 | -115.663 |
| Vágs kommuna | 12.144.028 | 4.503.000 | 16.647.028 | 16.702.331 | 2.443.829 | 2.388.526 |
| Sumbiar kommuna | 3.625.083 | 909.000 | 4.534.083 | 5.004.444 | 500.681 | 30.320 |
| | 40.374.362 | 13.008.996 | 53.383.358 | 55.674.438 | 3.925.225 | 1.634.145 |
| Tórshavnar kommuna | 132.134.275 | 38.166.996 | 170.301.271 | 187.480.000 | | -17.178.729 |
| **Tilsamans** | **351.719.144** | **113.117.988** | **464.837.132** | **502.793.662** | **10.898.291** | **-27.058.239** |



*Norðdepil*

kommunurnar hava av eldraøkinum. Umframt vísir talvan eisini tær innanhýsis flytingar, sum eru ímillum kommunurnar, fyri at síggja nettoútreiðslurnar hjá kommununum. Nú verður lættari at síggja, hvørjar avleiðingar fíggingarleisturin ítøkiliga hevur fyri einstøku kommunurnar.

Tað er týðuligt, at tær kommunur, ið hava nógvar borgarar, sum eru undir serskattaskipanum, eru tær kommunur, sum fáa frægast burturúr fíggingarleistinum. Tann missin hesar kommunur áður hava verið fyri, tí at borgarar undir serskattaskipanum ikki rindaðu kommunuskatt, hann fáa tær nú aftur umvegis fíggingarleistin á eldraøkinum.

Tá ið talan er um innanhýsis flytingar millum kommunurnar, so er í flestu førum talan um, at tær kommunur, sum hava gjørt íløgur á eldraøkinum partvíst fáa eina kompensatión frá hinum kommunum, sum frammanundan ongar íløgur hava gjørt á eldraøkinum. Men hesi viðurskifti skulu eisini takast við fyrivarni, tí kommunalu samstørvini hava skipað seg ymiskt, tá ið tað snýr seg um ognarviðurskiftini á røktarheimum og sambýlum.

Samanumtikið er tó lítið at ivast í, at kommunurnar samanlagt hava fingið fleiri útreiðslur enn inntøkur í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum.

Hetta er ein spurningur, sum eigur at verða tikin upp í samband við tí samlaðu eftirmetingina av eldraøkinum.

# Ískoyti 2: Kommunuhugtakið

## KOMMUNUR OG KOMMUNUHUGTAKIÐ

Hugtakið lokalt sjálvræði er elligamalt og byggir á hugsunarhátt úr rómverskum rætti, og snúði seg í høvuðsheitum um, at borgarar í einum býi ella øki høvdu framíhjárættindi sum borgarar í rómverska ríkinum, men vórðu stýrd av egnum lokalum myndugleikum eftir sínum egnu lógum.

Tann kommunala skipanin, ið vit í dag hava í Føroyum, er í stóran mun ávirkað av danskari og norðurlendskari fyrisitingar- og lóggávusiðvenju.

Longu seint í miðøldini høvdu kommunur nógvar ymsar uppgávur at røkja og hetta broyttist nakað undir einaveldinum, men við donsku grundlógini frá 1849 bleiv sjálvstøðugi rætturin hjá kommununum til at røkja egnar uppgávur staðfestur. Tó var staturin eftirlitsmyndugleiki.

Fyrsta føroyska kommunulógin kom í 1872, og nú galdandi kommunustýrislógin er frá ár 2000.

Í Føroyum hava vit nú 29 sjálvstøðugar kommunur, sum í støðd á fólkatali eru spjaddar frá nøkrum tíggjutals íbúgvum til Tórshavnar kommunu við meira enn 20.000 íbúgvum. Hóast hesa spjaðing í støðd, er formliga grundarlagið undir føroysku kommununum stórt sæð eins.

## KOMMUNUR Í STÝRISSKIPANARLIGUM HØPI

Lokalt sjálvræði er ein týðandi hornasteinur í okkara fólkaræði. Í § 82 í donsku grundlógini er ásett, at *"Kommunernes ret til under statens tilsyn selvstændigt at styre deres anliggender ordnes ved lov."*

Sambært hesum er greitt, at kommunurnar hava rætt til sjálvstøðugt at stýra egnum viðurskiftum. Kommunurnar hava sjálvstøðugt fíggjarligt frælsi og politiskt sjálvræði. Kommunurnar eru sostatt sjálvstøðugar politiskar og fyrisitingarligar eindir. Harumframt er breið semja um, at málsførleikin hjá kommununum ikki kann avmarkast á ein tílíkan hátt, at tað ikki longur er talan um veruligt sjálvræði. Umframt rættin til sjálv at útskriva og krevja upp skatt, er kommunalt sjálvræði tengt at teimum uppgávum, ið kommunurnar skulu loysa og tí politiska rásarúmi, sum kommunurnar hava til at leggja til rættis, hvussu kommunalar uppgávur skulu loysast.

§ 82 í grundlógini merkir eisini, at viðurskiftini millum landsmyndugleikarnar og kommunurnar ikki eru yvir- og undirskipað, eins og landsfyrisitingin ikki hevur heimildir at geva kommununum boð, á sama hátt sum annars er galdandi í viðurskiftunum millum landsfyrisitingina og stovnar undir landinum. Bindandi reglur fyri kommunur skulu vera ásettar við heimild í lóg ella aðrari rættarkeldu.

Umframt í grundlógini, er lokalt sjálvræði við tilverurættinum hjá kommununum staðfestur í § 56 í stýrisskipanarlógini, ið er soljóðandi: *"Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø.m."*

Sambært fyrireikandi arbeiðinum, orðaljóðinum og viðmerkingunum til § 56, er ásetingin í stýrisskipanarlógini ein beinleiðis endurtøka av tí rætti, sum kommunurnar longu frammanundan hava eftir § 82 í grundlógini.

Umframt staðfestingina í grundlógini og stýrisskipanarlógini um rættin hjá kommunum at skipa egin viðurskifti, er lokala sjálvræðið eisini ein týðandi táttur í evropeisku demokratisku siðvenjuni. Sambært evropeiska sáttmálanum um lokalt sjálvræði frá 1985, verður lokalt sjálvstýri hugsað sum rætturin og førleikin hjá einum lokalum myndugleika, innan lógarinnar karmar, at stýra og fyrisita einum munandi parti av almennum viðurskiftum, við egnari ábyrgd og við støði í áhuganum hjá fólkinum á staðnum.

Almennar uppgávur skulu í høvuðsheitum røkjast av myndugleikum, sum eru borgaranum næstir. Um annar myndugleiki skal røkja uppgávuna, so eigur hetta at vera grundað á, hvat slag og av hvørjum vavi uppgávan er, og við atliti at virkisføri og fíggjarligum viðurskiftum. Tær heimildir, ið eru lagdar til lokalar myndugleikar, eiga vanliga at vera givnar til fulnar og vera óskerdar. Heimildirnar eiga heldur ikki at verða gjørdar verri ella avmarkast av øðrum almennum myndugleika, uttan so at hetta er heimilað í lóggávuni.

Europæiski sáttmálin um lokal sjálvræði ásetur nakrar meginreglur, og eru hesar í høvuðsheitum,

- at almennar uppgávur skulu røkjast av einum myndugleika so tætt at borgaranum sum gjørligt,
- at teir lokalu myndugleikarnir skulu hava veruligt sjálvræði yvir teimum uppgávum, ið landafrøðiliga liggja lokalt, og
- at lokalu myndugleikarnir skulu kunna útvega sær fígging til at loysa uppgávuna, her í millum eisini rætt til at útskriva lokalan skatt.

## KOMMUNUNALRÆTTURIN

Kommunalrættur verður vanliga býttur í 3 ymsar tættir, sum er: lóggáva, ið regulerar kommunal viðurskifti, kommunufulltrúin og kommunala eftirlitið.

Lóggáva um kommunal viðurskifti snýr seg í høvuðsheitum um at skipa lóggávu viðvíkjandi økjum, har kommunur hava skyldur og heimildir mótvegis borgarum sínum. Kommunufulltrúin er eitt heimildargrundarlag sum ikki er regulerað í lóg, men sum kommunurnar kunnu nýta sum heimild at virka á, um ávísar treytir eru loknar. Umframt ta lóggávu, sum beinleiðis regulerar kommunal viðurskifti, eru kommunurnar eisini almennir myndugleikar, og eru tær tí eisini fevndar av fyrisitingarligari lóggávu sum t.d. fyrisitingarlóg, lóg um innlit í fyrisitingina o.t.

Viðurskiftini hjá føroysku kommununum verða stýrd yvirskipað eftir kommunustýrislógini frá 2000. Sambært hesi lóg er kommunustýrið evsti politiski og fyrisitingarligi myndugleiki í kommununi og hevur evsta vald og evstu ábyrgd av kommunalum viðurskiftum.

Landsstýrið hevur eftirlit við kommununum. Kommunala eftirlitið er eitt sokallað *legalitetseftirlit*, sum merkir, at landsstýrið hevur eftirlit við, at kommunurnar halda galdandi lóggávu. Hinvegin skal eftirlitið ikki taka støðu til, hvørt kommunurnar bera seg skynsamt at, tí hetta hoyrir undir politiska frælsið hjá kommununum at gera

av. Kommunala eftirlitið hevur eisini heimild at gera av ivamál um, hvar mørkini fyri heimildum eftir kommunu-fulltrúini eru.

Samanumtikið eru eyðkennini fyri lokala sjálvræðið,

- at kommununnar tilverurættur er tryggjaður í grundlóg og stýrisskipanarlóg og byggir á evropeiska demokratiska siðvenju,
- at kommunurnar eru sjálvstøðugar politiskar og fyrisitingarligar eindir við fíggjarligum og politiskum frælsi,
- at kommunurnar hava frælsi at gera egnar raðfestingar í mun til tær uppgávur, tær skulu røkja,
- at kommunur ikki eru undirskipaðir stovnar undir landinum og tískil kann landið ikki geva kommununum bindandi boð,
- at kommunur hava rætt til at útskriva egnar skattir og at nýta hesar inntøkur eftir egnum politiskum raðfestingum.

# Um Kommunufelagið

**Stýrið 2019**
**Stýri felagsins er mannað við borgarstjórum samsvarandi §7 í viðtøkunum:**
Dennis Holm, formaður, Vágs kommuna
Heðin Zachariasen, næstformaður, Sunda kommuna
Annika Olsen, Tórshavnar kommuna
Aimé Jacobsen, Sørvágs kommuna
Brandur Sandoy, Sands kommuna
Eyðdis Hartmann Niclasen, Vága kommuna
Jógvan Skorheim, Klaksvíkar kommuna
Jógvan í Skorini, Eiðis kommuna
Jóhan Christiansen, Eysturkommuna
Kristin Michelsen, Tvøroyrar kommuna
Pauli T Petersen, Vestmanna kommuna
Sonni á Horni, Fuglafjarðar kommuna
Torbjørn Jacobsen, Runavíkar kommuna

**Starvsfólkabólkurin 2019**
**Í starvsbólkinum eru umsitingarleiðararnir sambært §8 í viðtøkunum:**
Formaður: Jákup Frants Larsen, Fuglafjarðar kommuna
Bjørgfríð Ludvig, Tórshavnar kommuna
Dinna Jensen, Runavíkar kommuna
Erik Lervig, Eysturkommuna
Eyðun Kjølbro, Sunda kommuna
Guðrun Ejdesgaard, Eiðis kommuna
Jóannes N. Dalsgaard, Vága kommuna
Jónleyg Bech, Tvøroyrar kommuna
Marner Højsted, Sands kommuna
Maud Poulsen, Vestmanna kommuna
Petry Joensen, Vágs kommuna
Sunrid Rasmussen, Sørvágs kommuna
Tummas T. Eliasen, Klaksvíkar kommuna



*Tindhólmur*

**Nevndin í KAF**
Annika Olsen, forkvinna, Tórshavnar kommuna
Brandur Sandoy, næstformaður, Sands kommuna
Bogi Bendtsen, SEV
Jógvan í Skorini, Eiðis Kommuna
Pauli Trónd Petersen, Vestmanna Kommuna
Poul Andreas Joensen , IRF

**Skrivstovan**
Kommunufelagið
R. C. Effersøesgøta 26
100 Tórshavn
Telefon 30 24 80
www.kf.fo
kf@kf.fo

| **Starvsfólk KF** | **Teldupostur:** | **Telefon:** |
|---|---|---|
| Eyðun Christiansen, stjóri | eydunc@kf.fo | 282480 |
| Jóhan Lamhauge, løgfrøðiligur ráðgevi | johanlam@kf.fo | 521975 |
| Sveiney Sverrisdóttir, fulltrúi | sveiney@kf.fo | 590760 |
| Armgarð Hammer, skrivari | armgard@kf.fo | 282481 |
| Martin Johannessen, skrivstovufólk | martin@kf.fo | |

| **Starvsfólk KAF** | **Teldupostur:** | **Telefon:** |
|---|---|---|
| Anita Fuglø, leiðari | anita@kaf.fo | 226339 |
| Marin á Brúnni, fulltrúi | marin@kaf.fo | 280339 |
| Una Djurhuus Christiansen, fulltrúi | una@kaf.fo | 269015 |

| **Starvsfólk BVS** | **Teldupostur:** | **Telefon:** |
|---|---|---|
| Oddbjørg Balle, leiðari | ob@bvs.fo | 225696 |
| Hallbjørg Lamhauge, (Í Farloyvi) | hl@bvs.fo | 212497 |
| Jendis Gærdbo, sosialráðgevi | jl@bvs.fo | 223023 |
| Óli Rubeksen, SSP ráðgevi | or@bvs.fo | 222498 |
| Hans Andreas Dam Joensen, dygdarmennari | hansadj@bvs.fo | 210844 |



# Viðtøkur fyri Kommunufelagið

**Navn, limaskapur og heimstaður**
**§ 1.** Navn felagsins er Kommunufelagið, og hevur felagið heimstað í Tórshavn

**§ 2.** Allar kommunur í  Føroyum kunnu gerast limir.

**§ 3.** Upptøka av nýggjum limum verður góðkend á aðalfundi.

**Endamál**
**§ 4.** Endamál felagsins er at virka fyri felags áhugamálum, størri kommunalum sjálvræði, og betri samstarvi millum kommunurnar.

**Aðalfundurin**
**§ 5.** Aðalfundurin er hægsta vald felagsins.
*Stk. 2.* Borgarstjórin umboðar kommunustýrið til at taka avgerð á aðalfundinum. Aðrir kommunustýrislimir hava rætt at møta.



*Hvítanes*

*Stk. 3.* Boðast skal til aðalfund við í minsta lagi 30 daga freist. Fundarskrá verður kunngjørd limakommununum í seinasta lagi 14 dagar innan aðalfundin.

*Stk. 4.* Limir, ið vilja hava mál til viðgerðar á aðalfundinum, senda felagnum hesi í minsta lagi 21 dagar innan aðalfundin.

*Stk. 5.* Á aðalfundi hevur hvør kommuna eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar undan aðalfundinum, tó so, at eingin kommuna hevur fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.

*Stk. 6.* Er ikki annað tilskilað í hesum viðtøkum, verða avgerðir á aðalfundi tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.

*Stk. 7.* Aðalfundurin er viðtøkuførur, tá ið minst helvtin av limunum eru møttir.

**§ 6.** Ársaðalfundur verður hildin á hvørjum árið í seinasta lagi 30. apríl við hesi skrá:

a) Val av fundarstjóra.
b) Formaðurin letur frágreiðing um virksemi felagsins í farna árinum og um framtíðarætlanir felagsins.
c) Framløga av roknskapi til góðkenningar.

d) Val av grannskoðara.
e) Innkomin uppskot.
f) Ymiskt.

*Stk. 2.* Eykaaðalfundur verður hildin, tá ið stýrið heldur tað vera neyðugt, ella tá ið minst helmingurin av limakommununum skrivliga biðja um tað. Innkalling til eykaaðalfund fer fram á sama hátt og við somu freist, sum til vanligan aðalfund.

**Stýrið**

**§ 7.** Tá talan ikki er um mál, sum skulu viðgerast á aðalfundi, er ovasta leiðsla felagsins eitt stýri við 13 limum, sum er sett saman fyri 4 ár í senn. Stýrislimur skal vera borgarstjóri.

*Stk. 2.* Stýrið tekur við 1. januar eftir kommunustýrisval, og verður stýrið valt eftir hesi skipan:

- Norðuroyggjar (Klaksvík, Hvannasund, Viðareiði, Húsa k., Kunoy og Fugloy) 1 lim.
- Eystur Eysturoy (Fuglafjørður, Eystur k.) 2 limir.
- Vestur Eysturoy (Nes, Runavík, Sjóvar k.) 1 lim.
- Sundalagið (Sunda k. og Eiði) 1 lim.
- Streymoy (Tórshavn) 1 lim.
- Vesturstreymoy (Vestmanna og Kvívík) 1 lim.
- Vágar (Sørvágur, Vága k.) 1 lim.
- Sandoy (Sandur, Skopun, Skálavík, Húsavíkar k. og Skúvoy) 1 lim.
- Norður Suðuroy (Hvalba, Tvøroyri og Fámjin) 1 lim.
- Suður Suðuroy (Hov, Porkeri, Vágur og Sumba) 1lim.

Kommunustýrini í hvørjum einstøkum øki gera semju um at velja ein stýrislim. Semjast kommunurnar ikki um umboðanina, verður borgarstjórin í størstu kommununi umboð fyri økið.

*Stk. 3.* Kommunurnar sum sambært stk. 2 ikki fáa lim í stýrið, velja 2 umboð eftir hesum leisti.
Kommunurnar við fleiri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð
Kommunurnar við færri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð

*Stk. 4.* Tá ið valt verður sambært stk. 3, hevur hvør kommuna eina atkvøðu. Atkvøðugreiðslan fer fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2 í kommunustýrislógini.

*Stk. 5.* Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni eftir somu mannagongd, sum formaður og næstformaður verða valdir í kommunustýrum, tó so, at formaður og næstformaður verða valdir fyri 2 ár í senn.

*Stk. 6.* Stýrisfundur er viðtøkuførur, tá ið minsta lagi helmingurin av stýrislimunum eru møttir. Hvør stýrislimir hevur eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar í teimum kommununum, sum stýrislimurin umboðar. Tó so, eingin stýrislimir kann hava fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.

*Stk. 7.* Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Miðast skal tó ímóti, at stýrisavgerðir eru einmæltar.

*Stk. 8.* Stýrisfundur skal vera í minsta lagi eina ferð hvønn ársfjórðing. Formaðurin kann kalla stýrið til fundar, tá mál er, sum krevur stýrisavgerð, og sum ikki kann bíða til næsta regluliga fund. Stýrið kann eisini verða kallað saman, tá ið minst helmingurin av stýrislimunum skrivliga biðja um tað

*Stk. 9.* Fráboðan um stýrisfund verður send stýrislimum 14 dagar áðrenn fund.

**Starvsbólkurin**

**§ 8.** Í starvsbólkinum sita kommunuskrivararnir/-stjórarnir í teimum kommunum, sum hava umboð í stýrinum. Stýrið velur starvsbólkaformann fyri tvey ár í senn.

*Stk. 2.* Starvsbólkurin skal fyrireika mál, sum skulu viðgerast á stýris- og aðalfundi, og hann skal arbeiða við øllum málum, sum stýrið beinir til hansara.

*Stk. 3.* Starvsbólkurin hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin.

*Stk. 4.* Tó skal formaðurin kalla til fundar, hvørja ferð stýrisfundur er lýstur, um so er, at mál, sum skulu viðgerast har, ikki eru liðug fyrireikað.

*Stk. 5.* Allir starvsbólkalimir skulu møta á stýrisfundum.

*Stk. 6.* Stýrisformaðurin skal hava fundarboð til hvønn starvsbólkafund.

**Skrivstovan**

**§ 9.** Stýrið setur og loysir úr starvi stjóra, ið hevur ábyrgdina mótvegis stýrinum, fyri at virksemi felagsins verður rikið sambært galdandi reglum.

*Stk. 2.* Stjórin hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi, og skal í samstarvi við starvsbólkin og stýrið umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.

*Stk. 3.* Stýrið ger starvsskipan fyri stjóran.

*Stk. 4.* Stjórin setur og loysir úr starvi onnur starvsfólk eftir ásetingum í starvsskipanini sambært stk. 3.

*Stk. 5.* Starvsbólkurin er dagliga bindiliðið millum stjóran og limakommunurnar.

**Fíggjarviðurskifti**

**§ 10.** Útreiðslurnar av at reka felagið verða goldnar av limakommununum. Limagjaldið verður ásett samsvarandi

íbúgvaratalinum í kommununum 1. januar í tí ári, sum fíggjarætlanin verður samtykt. Tó kann eingin kommuna rinda meira enn 45 % av limagjaldinum.

*Stk. 2.* Stýrisformaðurin ger saman við starvsbólkaformanninum og stjóranum uppskot til fíggjarætlan fyri felagið komandi fíggjarár, sum hann fyrileggur stýrinum til góðkenningar í seinasta lagi í apríl ársfjórðingi.

*Stk. 3.* Áðrenn fíggjarætlan felagsins verður viðgjørd í stýrinum, skal starvsbólkurin hava gjørt sítt tilmæli.

*Stk. 4.* Limakommunurnar rinda í minsta lagi 1/12 part av limagjaldinum hvønn mánað til felagið.

*Stk. 5.* Eingin limakommuna heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hennara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

*Stk. 6.* Ongar avgerðir í málum, sum krevja kommunustýrissamtykt, eru bindandi fyri limakommunurnar, uttan tílík samtykt fyriliggur.

**Roknskapur**
**§ 11.** Stjórin hevur ábyrgd av roknskaparførsluni.
*Stk. 2.* Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum ella skrásettum grannskoðara.

**Aðrar ásetingar**
**§12.** Felagið verður teknað av stýrisformanninum og starvsbólkaformanninum ella stjóranum í felag, ella av tveimum stýrislimum saman við starvsbólkaformanninum ella stjóranum.

**§ 13**. Samtyktir um broytingar av viðtøkunum ella avtøku av felagnum skulu gerast av aðalfundinum. Í minsta lagið ¾ av atkvøðutalinum skulu vera umboðað, og uppskotið skal samtykkjast við 3/5 av greiddum atkvøðum.
*Stk. 2.* Er fundurin ikki viðtøkuførur, verður nýggjur fundur 14 dagar seinni, og er hesin viðtøkuførur uttan mun til, hvussu nógvar atkvøður eru umboðaðar. Samtykt skal tó vera við 3/5 av greiddum atkvøðum.

**§ 14.** Við minst 6 mánaða ávaring kann ein kommuna siga upp limaskap sín í felagnum til ein 1. januar.
*Stk. 2.* Kommunur, ið melda seg úr felagnum, hava einki krav móti felagnum ella ognum felagsins, og hefta ikki fyri skyldur felagsins.

**§ 15.** Verður felagið tikið av, falla ognirnar aftur til limakommunurnar í sama lutfalli, sum tær hava luttikið í útreiðslum felagsins seinasta roknskaparárið.

**Skiftisásetingar**
**§ 16**. Felagið tekur yvir øll rættindi og allar skyldur hjá KSF og FKF.

**§ 17.** Í sambandi við fyrsta valskeiðið, sum verður trý ár, tekur stýrið sjálvt avgerð um val av formanni og næstformanni sambært § 7, stk. 5, og viðvíkjandi val av starvsbólkaformanni sambært § 8, stk. 1.

**§ 18.** Limagjald fyri fyrsta roknskaparárið verður samtykt á stovnandi aðalfundi.

**Gildiskoma**
**§ 19.** Viðtøkur felagsins fáa gildi frá 1. januar 2014.

*Samtykt á stovnandi aðalfundi 13. desember 2013*

# Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**§ 1 Navn og limaskapur**
*Stk. 1.* Navn felagsins er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stytt KAF.

*Stk. 2.* KAF er sjálvstøðugt limafelag undir Kommunufelagnum, stytt KF

*Stk. 3.* Limir í felagnum eru umframt KF, Elfelagið SEV, stytt SEV og L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stytt IRF

*Stk. 4.* Heimstaður felagsins er Tórshavn

**§ 2 Endamál felagsins**
*Stk. 1.* Endamál felagsins er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. Hetta verður gjørt við at:

- samskipa lønarlagið og samráðast um sáttmála við starvsfólka- og fakfeløg, sum hava samráðingarrætt

- røkja áhugamál limanna í málum um lønar- og setanarviðurskifti, starvsmetingum, útbúgving o.a., og røkja samskifti við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum samráðst verður við og myndugleikar annars, við neyðugum atliti til kommunustýrislógina § 5, stk. 5.

- virka fyri og ansa eftir, at galdandi sáttmálar verða hildnir

- gera sítt til, at tað slepst undan trætumálum millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ella um hetta ikki ber til, at royna at fáa tey loyst á friðarligan hátt, uttan arbeiðssteðg. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál, røkir felagið, tá heitt verður á tað, mál arbeiðsgevaranna so langt, sum hóskandi verður hildið

- virka fyri, at trætumál limanna millum verða loyst

- við skeiðvirksemi ella á annan hátt upplýsa limir felagsins um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalum/interkommunala arbeiðsgevara áhugamálum

**§ 3 Upptøka**
*Stk. 1.* KF og interkommunalir felagsskapir í Føroyum kunnu gerast limir við skrivliga at senda umsókn til nevnd felagsins.

*Stk. 2.* Limir í felagnum skriva undir viðtøkur felagsins, soleiðis sum tær eru, ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar

**§ 4 Útmeldan**
*Stk. 1.* Eingin kann siga seg úr felagnum, uttan við innskrivaðum brævi og við 6 mánaða freist.

*Stk. 2.* Hóast limur sigur seg úr felagnum, er hann framvegis bundin av galdandi sáttmálum, til hesir halda uppat.

*Stk. 3.* Limur, sum fer úr felagnum, hevur einki krav móti felagnum.

**§ 5 Ársfundur**
*Stk. 1.* Ársfundur verður hildin á hvørjum ári innan 1. mai.

*Stk. 2.* Nevndin í KAF hevur rætt til at luttaka á aðalfundinum hjá KF, men ikki skyldu at luttaka.

*Stk. 3.* Innkalling til ársfund verður gjørd í minsta lagi 14 dagar frammanundan.

*Stk. 4.* Saman við innkallingini verður sendur grannskoðaður roknskapur og onnur innkomin mál.

*Stk. 5.* Atkvøðurættur: KF hevur 4 atkvøður, SEV og IRF hava 1 atkvøðu hvør.
Ársfundurin er viðtøkuførur, tá meira enn helmingurin av atkvøðutalinum eru umboðað. Allar avgerðir á ársfundinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.

*Stk. 6.* Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu vera KAF í hendi seinast 4 vikur undan ársfundinum. Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu vera felagnum í hendi í so góðari tíð, at tey kunnu takast við í fundarfráboðanina, um tey skulu koma til viðgerðar á aðalfundi.

*Stk. 7.* Ársfundurin verður skipaður við hesi skrá:

a) Formaðurin skipar fyri vali av fundarstjóra
b) Formansfrágreiðing um virki felagsins í farna ári.
c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi
d) Innkomin mál.
e) Ymiskt

**§ 6 Nevndin**
*Stk. 1.* Í nevndini sita 6 limir, sum verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunustýrisval og virka til nýggj nevnd er vald. KF velur 4 limir, meðan SEV og IRF velja hvør sín lim. Á sama hátt verða 6 varalimir tilnevndir.

*Stk. 2.* Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limirnir eru tilnevndir, og í seinasta lagi 1. mai.

*Stk. 3.* Nevndin ger sína egnu starvsskipan.

*Stk. 4.* Nevndin velur sjálv formann og næstformann.

*Stk. 5.* Nevndarfundur er so ofta, sum formaðurin metir tað vera neyðugt, ella um ein nevndarlimur setir ynski fram um tað.

*Stk. 6.* Nevndin er viðtøkufør, tá meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru á fundi.

*Stk. 7.* Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.

*Stk. 8.* Um tað, sum fer fram á nevndarfundi, verður gjørd fundarfrágreiðing, sum allir nevndarlimir góðkenna.

**§ 7 Skrivstovan**
*Stk. 1.* Fyrisitingin í KAF er partur av fyrisitingini í KF.

*Stk. 2.* Ovasta fyrisitingarliga leiðsla felagsins er stjórin í KF. Stjórin setur og loysir úr starvi starvsfólk í KAF í samráð við nevnd felagsins.

*Stk. 3.* Í øllum málum sambært § 2 virkar fyrisitingin í KAF undir leiðslu av nevnd felagsins.

*Stk. 4.* Skrivstovuleiðarin í KAF hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi og skal í samstarvi við stjóran í KF og nevnd felagsins umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.

**§ 8 Limagjald**
*Stk. 1.* Tá nýggir limir verða upptiknir, skal samráðast um limagjaldið.

*Stk. 2.* Formaðurin ger saman við stjóranum í KF og skrivstovuleiðaranum í KAF uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár, harundir ásetan av limagjaldi. Formaðurin leggur uppskotið fyri nevndina til góðkenningar í seinasta lagi tann 1. juli.

*Stk. 3.* KF rindar 2/3 av ásetta limagjaldinum. SEV og IRF rinda 1/3 av ásetta limagjaldinum, og av hesum rindar SEV 2/3 og IRF 1/3.

*Stk. 4.* Eingin limur heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hansara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

**§ 9 Tekning**
*Stk. 1.* Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella saman við skrivstovuleiðaranum fyri KAF.

**§ 10 Samráðingarnevnd**
*Stk. 1.* Nevndin tilnevnir umboð og formann í samráðingarnevnd. Við sáttmálasamráðingar, sum viðvíkja SEV og IRF, kann umboð frá nevndu felagsskapum luttaka sum partur av samráðingarnevndini. Annars kann samráðingarnevndin, eftir meting nevndarinnar, víðkast við umboðum fyri teir einstøku limirnar.
Samráðingarnevndin kann, um nevndin ynskir tað, leita sær sakkunnleika aðrastaðni.

*Stk. 2.* Uppgávan hjá samráðingarnevndini er at samráð-

ast við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum hava rætt til at samráðast um øll sáttmálaviðurskifti.

*Stk. 3.* Samráðingarnevndin ger sína egnu starvsskipan.

**§ 11 Roknskapur og grannskoðan**
*Stk. 1.* Roknskapurin hjá KAF er ein sjálvstøðugur roknskapur, sum er partur av roknskapinum hjá Kommunufelagnum og verður grannskoðaður, sum ein partur av hesum.

*Stk. 2.* Inntøkur og útreiðslur fyri KAF verða neyvt atskildar frá fíggjarviðurskiftunum hjá KF annars.

**§ 12 Tagnar- og upplýsingarskylda**
*Stk. 1.* Limir felagsins hava tagnarskyldu viðvíkjandi upplýsingum um innanhýsis viðurskifti í felagnum.

*Stk. 2.* Limirnir hava skyldu til, eftir áheitan frá nevndini, at lata teir upplýsingar, ið hava týdning fyri at kunna samráðast, umframt upplýsingar um lønar-, arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti fyri starvsfólkið. Hesir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

**§ 13 Trætumál**
*Stk. 1.* Verður arbeiðssteðgur ella trætumál millum lim í felagnum og starvsfólk tess ella fakfelagið, binda hinir limirnir í felagnum seg at stuðla og hjálpa viðkomandi limi mest møguligt við m.a. at taka lut í móttiltøkum, sum nevndin í felagnum samtykkir at seta í verk.

*Stk. 2.* Allir limir binda seg til, um nevndin boðar frá tí, ikki at seta fólk hjá teimum limum í starv, har arbeiðssteðgur er, fyrr enn hann er hildin uppat.

**§ 14 Gerðarrættur**
*Stk. 1.* Trætumál millum felagið og lim kann leggjast fyri gerðarrætt.

*Stk. 2.* Í gerðarrættinum eru tveir limir, har felagið velur annan og limurin hin, umframt ástøðumann, sum verður tilnevndur av Føroya rætti.

*Stk. 3.* Avgerðin hjá gerðarrættinum er endalig og kann ikki leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

**§ 15 Avtøka av felagnum**
*Stk. 1.* Felagið verður tikið av, tá ið minst ¾ av limunum ynskja tað.

*Stk. 2.* Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins býttar millum limir felagsins á tann hátt, at miðaltalið fyri limagjaldið trý tey seinastu árini gevur lutfalstalið til hvønn lim.

**§ 16 Gildiskoma**
*Stk. 1.* Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar á aðalfundi í KAF.

*Tórshavn hin 12. mars 2014*

# Viðtøkur fyri Barnaverndarstovu Føroya

**§ 1.** Barnaverndarstova Føroya er felagskommunalur stovnur, sum kommunurnar eiga.

**Endamál stovnsins**
**§ 2.** Barnaverndarstovan skal arbeiða fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkini úti um landið og seta á stovn og reka fosturforeldraskipan sambært ásetingunum í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd við seinni broytingum.

**Politisk leiðsla**
**§ 3.** Ovasta politiska leiðsla stovnsins er stýrið í Kommunufelagnum.
**Fyrisiting**
**§ 4.** Stjórin fyri KF setir leiðara at hava dagligu fyrisitingarligu og fakligu leiðsluna av Barnaverndarstovuni.

*Stk. 2.* Stjórin fyri KF letur gera starvsskipan fyri leiðaran.

*Stk. 3.* Stjórin í KF setur og loysir úr starvi øll starvsfólk á Barnaverndarstovuni.

*Stk. 4.* Leiðarin fyri Barnaverndarstovuna vísir fyrisitingarliga til stjóran fyri Kommunufelagið.

**Fígging**
**§ 5.** Kommunufelagið rindar allar útreiðslur fyri Barnaverndarstovuna

*Stk. 2.* leiðarin ger saman við stjóranum innan 1 juli eina fíggjarætlan sum verður partur av samlaðu fíggjarætlanin hjá KF.

**Grannskoðan**
**§ 6.** Roknskapurin verður grannskoðaður, sum ein partur í roknskapinum hjá KF.

**Gildiskoma**
**§ 7.** Hesar viðtøkur koma í gildi 1. januar 2014.

**Skiftisáseting**
**§ 8.** Verandi nevnd fyri Barnaverndarstovuna – formenninir í KSF og FKF, áðrenn Kommunufelagið varð stovnað – halda áfram hetta valskeiðið til 1. januar 2017, men leggja øll mál av týdningi fyri stýrið í KF.

*Tórshavn 17.01.2014*